

# FRØÐI

2 / 2019 25. ÁRG. KR. 48,-

## KONSEPTIÐ FØROYAR
### GEVUR FØROYSKUM KONUM EINA RØDD

ÓVANLIGAR FLÓÐALDUR RAKTU FØROYAR

FØROYSKA HARAN OG HARUVEIÐAN Í FØROYUM

EITT SVAR ER EITT SVAR ER EITT SVAR?

# Frøði hesaferð!

*Lættvísindaligur lesnaður fyri øll!*

Sum kunnigt eru greinarnar í Frøði latnar í lættvísindaligan búnað. Teksturin er lættari og ikki so ástøðiligur sum eitt nú í vísindaligum doktararitgerðum. Blaðið letur eisini upp fyri lættvísindaligari gransking, ið t.d. byggir á eygleiðingar av ymiskum slag. Aftur at hesum er myndatilfar við til at lýsa innihaldið og soleiðis gera tað áhugaverdari fyri ein breiðan lesaraskara.

Í hesum blaðnum eru helst fleiri myndir enn vanligt. Nakrir av høvundunum hava gjørt sær ómak við at lýsa tað, teir skriva um, við bæði grafum og myndum, ið stuðla væl undir tekstin. Í fyrstu greinini hava tveir havfrøðingar og ein náttúrulandafrøðingur tikið seg saman um at lýsa, hvat tað var sum hendi, tá ið óvanligar flóðaldur vóru í Føroyum 29. og 30. juni 2019. Í Vágsbotni í Havn var stilli og spegilsslætt á sjónum, tá ið sjóvarmálin um átta tíðina um morgunin 30. juni fór at fløða upp um bryggjukantin. Eygleiðingar og dátur benda á, at talan var um meteotsunami, sum var elvd av knappligum falli í lufttrýsti í sambandi við óvanliga nógvan torusláttur í Norðsjónum.

Kanningar av fuglasløgum í USA og Evropa vísa eina afturgongd hjá nógvum fuglasløgum. Kanningar í Føroyum vísa, at sama gongd hevur verið í Føroyum. Men hóast nøkur fuglasløg eru í minking bæði í Føroyum og aðrastaðni, so eru tað onnur fuglasløg, sum standa í stað. Vit lesa um fuglateljingar úr Nólsoy, ið geva eina mynd av gongdini hjá nøkrum av vanligastu fuglasløgunum í oynni.

Hagtøl um haruveiðu hava stóran áhuga millum harumenn. Í drúgvari grein við nógvum myndum lesa vit søguna um haruna í Føroyum, frá tí hon varð innflutt í 1855 til í dag. Mest sum alt, ið hevur við haruna at gera, verður umrøtt, m.a. ættarbregði, atferð, føði, nøring, aldur, livitíð og haruveiða í teimum ymsu høgunum.

Í hugvekjandi grein verður sjóneyka sett á, hvat eyðkennir flyting hjá føroyskum konum millum Føroyar og Danmark. Greinin viðger tey ymisku samfelagsligu, søguligu og persónligu viðurskiftini sum ávirka, hvørji eyðkennir fólkaflyting millum ávís geografisk øki hevur.

Komu lippukassin og sjálvdrátturin úr Hetlandi við teimum sluppum, føroyingar keyptu haðani og úr Bretlandi? Kanska partvíst, men tað vísir seg, at føroyski sjálvdrátturin var munandi meira umfatandi, enn hann var í Hetlandi. Í hugleiðingum um føroysku lippukassamentanina verður staðfest, at hon ikki var serliga samhaldsføst. Bæði hetlendingar, íslendingar og fransmenn høvdu ymisk sløg av sjálvdrátti, sum helst vóru samhaldsfastari. Greinin staðfestir eisini, at sjálvdrátturin ikki var serliga virkin tey fyrstu 25 sluppfiskaárini.

Kanska fyrstu ferð nakrantíð er grein í Frøði, sum umrøðir tørvin á nøktandi argumentatión í einum fólkaræði. Greinin lýsir, hví fullfíggjað argumentatión er týdningarmikil í einum fólkaræði og vísir á nakrar nógv nýttar snildir í kjaki og politiskum orðaskifti.

Á hvørjum ári koma nýggj vespusløg til landið og í mongum førum eru hesi innslødd við vørum, serliga plantum og trøum. Ein grein viðger námsvespuormverur á dúnbjørk- og sitkaelribløðum í Føroyum.

At enda er grein um rottuna. Genkanningar vísa, at rottan er komin til Føroya í trimum umførum. Í 1768 kom hon til Hvalbiar. Árið eftir kom hon til Havnar og spjaddi seg til restina av Streymoynni og aðrar oyggjar við. 120 ár seinni kom rottan eisini í Borðoynna.


FRØÐI 2 / 2019

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

FØROYA FRÓÐSKAPARFELAG
GEVUR FRØÐI ÚT


© Føroya Fróðskaparfelag og høvundarnir.


Frøði er fólksligt vísindablað, sum kemur út tvær ferðir árliga.

Upplag 1.300
ISSN 1395-0045
Forsíðumynd: Ari Magg


*Loyvt er at endurgeva út Frøði, um víst verður til heimildina. Verða heilar greinir endurgivnar, má avtala gerast.*


AVGREIÐSLA
Jarðfeingi, J. Paturssonar gøta 32-34
Postsmoga 3059
FO-110 Tórshavn
Tlf. 357000
teldupostur: frodi@jf.fo

RITSTUÐLAR
Fróðskaparsetur Føroya
Tjóðskjalasavnið
Tjóðsavnið
Landsbókasavnið
Havstovan
Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Jarðfeingi
Umhvørvisstovan

NÝGGIR HALDARAR
kunnu tekna seg hjá avgreiðsluni.

ELDRI ÚTGÁVUR AV FRØÐI
fáast við at venda sær til avgreiðsluna.

GREINIR TIL BLAÐIÐ
Fólksligar, vísindaligar greinir kunnu sendast ritstjórnini. Skrivlig høvundaleiðbeining fæst frá avgreiðsluni.

LÝSINGAR TIL FRØÐI
Er áhugi fyri at lýsa í blaðnum, setið tykkum tá í samband við avgreiðsluna, telefon 357000
fax 357001
teldupostur: frodi@jf.fo

LÝSINGARPRÍSUR
Heil síða: kr. 5.000,-
Hálv síða: kr. 3.000,-

RITUMBOÐSRÁÐIÐ
Erling Isholm, Fróðskaparsetur Føroya
Erla Olsen, Fróðskaparsetur Føroya
Sámal Tróndur Johansen, Tjóðskjalasavnið
Bjørg Mikkelsen, Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Maria Dam, Umhvørvisstovan
Lis Mortensen, Jarðfeingi
Eilif Gaard, Havstovan

GRAFISK FRAMLEIÐSLA
OG PRENT: Føroyaprent

SAMSKIPARI
Helgi Jacobsen

RITSTJÓRN
Zakaris Svabo Hansen *ábyrgd*
Birgitta Andreasen
Óluva Eidesgaard
Katrin Hoydal
Kirstin Eliasen
Winny í Pætursastovu

FRÓÐSKAPARFELAG FØROYA
Heimasíða: www.frodskaparfelag.fo
Limagjald: 300 krónur um árið, at gjalda á konto í Eik Banka 9181-495.171.0
SWIFT code: EIKBFOTF,
Iban-no: F056 9181 0004 9517 19
*Minnist til at viðmerkja navn.*



Mynd: Harald Bjørgvin

# Innihald


4 ÓVANLIGAR FLÓÐALDUR RAKTU FØROYAR
Karin Margretha H. Larsen, Sólva Eliasen og Lis Mortensen

10 GONGDIN HJÁ ÆÐU, TEISTA OG HEIÐAFUGLI Í NÓLSOY
Jón Aldará og Jens-Kjeld Jensen

14 FØROYSKA HARAN OG HARUVEIÐAN Í FØROYUM
Eyðfinn Magnussen

24 KONSEPTIÐ FØROYAR
Karin Jóhanna Knudsen

30 LIPPUKASSAMENTAN OG SJÁLVDRÁTTUR
Jóan Pauli Joensen

36 EITT SVAR ER EITT SVAR ER EITT SVAR?
Ingilín D. Strøm

40 NÁMSVESPUORMVERUR Á DÚNBJARKAR- OG SITKAELRISTRØUM
Jens-Kjeld Jensen

44 ROTTAN ER KOMIN TIL FØROYA Í TRIMUM UMFØRUM
Eyðfinn Magnussen





**Karin Margretha H. Larsen**
karinl@hav.fo
Havfrøðingur
Havstovan



**Sólvá Káradóttir Eliasen**
solvae@hav.fo
Havfrøðingur
Havstovan



**Lis Mortensen**
Lis.mortensen@jardfeingi.fo
Náttúrulandafrøðingur
Jarðfeingi

# ÓVANLIGAR FLÓÐALDUR RAKTU FØROYAR

Leygardagin 29. og sunnumorgunin 30. juni 2019 vórðu fólk ymsa staðni í Føroyum varug við, at óvanligar hendingar sóust á sjónum. Hvat var tað, sum hendi?

Í Vágsbotni í Havn var vindstilli og púra stilt á sjónum, tá sjóvarmálin um átta tíðina um morgunin tann 30. juni fór at fløða upp um bryggjukantin við bátabrúgvarnar. Í Havnini er vanliga lítil munur millum hægstu flóð og fjøru, men hendan morgunin flutti vatnstøðan seg knappliga meir enn ein metur. Sjógvurin fløddi upp á bryggjuna og gonguteigin og niðan til standmyndini av Nólsoyar Páll á torginum í Vágsbotni. Her steðgaði flóðin, og eins skjótt fór nú at fjara aftur. Næstu minuttirnar fjaraði sjógvurin útaftur so nógv, at eygleiðarar søgdu frá, at onkur bátur stóð á botni. So skjótt sjógvurin var fjaraður, fór aftur at fløða. Frá hægstu flóð til lægstu fjøru vóru einir 8 til 10 minuttir. Hetta endurtók seg nógvar ferðir, til sjógvurin gjørdist kúrrur aftur um 11-tíðina fyrrapartin.

Tónleikatiltakið Voxbotn hevði verið um náttina, og uppruddingin var um at vera liðug. Av tí sama gekk nakað av fólki í Vágsbotni henda sunnumorgunin og gjørdust eygnavitni til hesa sjáldsomu hending. Nógv fólk tóku myndir og videoupptøkur við fartelefonum, og fleiri fólk savnaðust at síggja, hvat tað var, sum hendi.

Á teimum sosialu miðlunum byrjaðu fólk ymsa staðni í Føroyum at boða frá líknandi eygleiðingum. Í Syðrugøtu fløddi sjógvurin, so boyur fóru undir og komu undan aftur fleiri ferðir. Í Klaksvík fløddi og fjaraði eisini fleiri ferðir hendan sunnumorgunin. Somu eygleiðingar vóru úr Kollafirði. Í Vági og Trongisvági vóru videoupptøkur, sum vístu, hvussu sjógvurin fløddi og fjaraði ferð aftan á ferð hesa løtuna.

Hóast tær flestu eygleiðingarnar vóru frá somu



**Í Vágsbotni 30. juni millum 8 og 11 um morgunin:** *Tað fløddi ferð eftir ferð upp á bryggjuna og gonguteigin niðan á torgið í Vágsbotni í Havn. Mynd: Bárður Poulsen*

tíð sunnumorgunin 30. juni, vóru einstakar eygleiðingar frá øðrum tíðarskeiðum. Ein maður greiddi frá, at tað fløddi og fjaraði nakrar ferðir í Skálafirði millum kl 22:30 og 24:00 leygarkvøldið 29. juni. Í Norðragøtu undraðu fólk seg yvir eina løgna fjøru, sum hendi stutt eftir middag sunnudagin. Her varnaðust fólk bert ta einu hendingina.

Felags fyri allar fráboðanirnar frá eygleiðarunum var, at fyribrigdið sást í firðum og víkum, sum venda eystureftir.

## Flóðaldurnar raktu ikki bert í Føroyum

Umframt fráboðanirnar í Føroyum, kom hópur av frágreiðingum úr Noregi um líknandi flóðaldur, sum raktu norsku strondina leygardagin 29. juni. Norska tænastan Flomvarsling á Noregs Vassdrags- og Energidirektorat (NVE) tók ímóti fráboðanum frá fólki, sum varnaðust flóðaldurnar. Felags fyri hesar frágreiðingar er, at tær hendu í einum víðum øki fram við norsku strondini, næstan eitt samdøgur áðrenn hendingarnar í Føroyum. Tær vísa seg ikki at peika aftur á eitt ávíst stað í havøkinum millum Føroyar og Noreg.

Vit fara her at greina nærri, hvat slag av aldum talan var um, og hvør upprunin kann hava verið.

## Hvat er ein flóðalda?

Aldurnar, sum raktu eystara part av Føroyum hetta tíðarskeiðið, eru sonevndar grunnar aldur við langari aldulongd. Treytin fyri at kalla aldur „grunnar aldur" er, at aldulongdin er minst 20 ferðir so stór sum botndýpið. Fyri hesar aldur er tað botndýpið, sum er avgerandi fyri, hvussu skjótt tær ferðast, og tær kunnu hava eina periodu (tíðarbil millum tveir alduryggir) úr fáum minuttum upp til ein tíma. Grunnar aldur verða á mannamunni kallaðar flóðaldur ella tsunami-aldur.

Ymsar orsakir eru til flóðaldur, og tær kendastu eru tsunami-aldur, sum kunnu vera sera ógvusligar og elva til stóran skaða. Síðstu árini eru vísindafólk tó vorðin varug við hugtakið *meteotsunami-aldur*,




**Mynd 1:** *Skurður úr Føroyum tvørtur um Hetlandsrennuna og suður í Norðsjógvin, har toruveður er. Ein meteotsunami kann taka seg upp í Norðsjónum, um toruveðrið har flytur seg við somu ferð, sum ferðin hjá longum aldum á hesum staðnum; tí tað er botndýpið á staðnum, sum avger, hvussu skjótt aldan ferðast. Tá aldan ferðast tvørtur um Hetlandsrennuna, veksur alduferðin, meðan alduhæddin minkar, men tá aldan kemur inn á føroyska landgrunnin, fer alduhæddin at vaksa, so hvørt sum dýpið minkar, samstundis sum ferðin minkar. Tá aldan nærkast landi, kunnu rúmligu skapini, t.d. inni í eini havn, skapa viðsveiggj, so at alduhæddin veksur enn meiri.*

ið hava ein annan uppruna enn „vanligu" tsunamialdurnar. Upprunin til hesi bæði sløgini av flóðaldum verður greinaður niðanfyri.

## Tsunami-aldur

Tsunami-aldur hava uppruna í hørðum jarðskjálvtum, omanlopum á havbotninum og stórum omanlopum av landi út á sjógv. Slíkar tsunami-aldur verða kallaðar seismiskar tsunamiir. Harðir jarðskjálvtar kunnu elva til flóðaldur við longum periodum, meðan tað verður hildið, at har havbotnurin hellir nógv, kunnu skriður ella omanlop í hellingini elva til flóðaldur við stuttum periodum. Tó kunnu skriður á havbotninum vera so veikar, at tær ikki verða máldar á seismografum og tískil kann tað verða torført at staðfesta, um upprunin til eina flóðaldu stavar frá hesum. Eyðkenni fyri flóðaldur frá omanlopum er, at tær hava miðdepil í tí staðnum, har omanlopið hendi, og hetta kann ofta staðfestast aftaná.

Var harður jarðskjálvti atvoldin til hendingarnar tann 29. og 30. juni? Harðir jarðskjálvtar eru lættir at staðfesta, tí teir verða fangaðir av mátistøðum, sum finnast um allan heim. Ein tsunami, sum verður elvd av jarðskjálvta, hevur miðdepil í jarðskjálvtaøkinum og breiðir seg út frá hesum staðnum. Í dag eru ávaringarskipanir settar upp nógva staðni. Tær meta um, hvussu skjótt ein møgulig tsunami-alda ferðast, og nær hon væntast at raka land. Við hesi tilbúgving ber til at ávara íbúgvar á staðnum, soleiðis at tey kunnu leita sær burtur frá sjóvarmálanum.

Í døgunum tann 29. og 30. juni, tá flóðaldurnar raktu Føroyar, vóru ongar fráboðanir um seismiskar ristingar staðfestar í Føroyum og heldur ikki í okkara grannalondum. Sostatt kunnu vit staðfesta, at jarðskjálvti var ikki upprunin til aldurnar.

Kann skriðulop á havbotninum vera uppruni til flóðaldurnar, sum vit sóu? Hóast ongar seismiskar ristingar eru máldar, so er tað í sær sjálvum ikki grund til at avvísa, at skriðulop á havbotninum var upprunin til aldurnar. Ein ábending um, at skriðulop ikki er atvoldin til hendingina er, at fráboðanirnar henda bæði leygarkvøld og sunnumorgun. Tað bendir á, at uppruni til flóðaldurnar er ikki frá einum miðdepli, men heldur einum víðari øki úti á havinum.



**Í Vágsbotni 30. juni millum kl. 8 og 11 um morgunin:** *Tað fjaraði nakrar ferðir nógv meir enn vanligt henda sunnumorgunin.*
*Mynd: Bárður Poulsen*




**Mynd 2:** *Snarljós í tíðarskeiðnum 29. juni kl. 6 til 30. juni kl. 6 (www.lightningmaps.org). Tey elstu snarljósini (t.v.s. snarljós fyrrapartin 29. juni) eru blálitt og tey nýggjastu (t.v.s. snarljós sunnunáttina 30. juni inntil kl. 06) eru gullitt. Sostatt sæst, at toruveðrið ferðaðist tvørtur um Skotland og síðani eystur gjøgnum norðara part av Norðsjónum hetta samdøgrið.*

**Mynd 3:** *Vatnstøðu-mátingar hjá Landsverki í Klaksvík, Tórshavn og á Krambatanga tíðarskeiðið 26. juni – 3. juli 2019. Allar tríggjar støðir vísa meiri óstøðuga vatnstøðu enn vanligt 29.-30. juni, og flóðaldan, sum rakti Føroyar fyrrapartin 30. juni, sæst serliga týðiliga í mátingunum úr Tórs-havn. Hesar mátingar eru gjørdar 10. hvønn minutt, og tí er møguligt, at broyt-ingarnar í vatnstøðu vóru enn størri enn mátað.*




## Meteotsunami-aldur

*Meteotsunami*-aldur verða elvdar av knappligum broytingum í veðrinum, tá lufttrýstið broytist nógv innan stutta tíð – tískil heitið: *Meteotsunami*, har *Meteo* stavar frá orðinum meteorologi ella veðurfrøði. Tað er ávíst, at ógvusligt toruveður kann elva til knappliga lækking av lufttrýstinum, soleiðis at vatn-skorpan undir torustorminum verður lyft upp nakrar sentimetrar. Tá eitt brádliga íkomið lágtrýst ferðast yvir einum havøki við júst somu ferð sum langar aldur á staðnum, verður viðsveiggj (resonansur), og langar aldur taka seg upp. Jú størri øki og longri tíð hetta hevur at virka yvir, jú meiri orka fer í alduna og tess størri verður alduhæddin. Tá aldan ferðast burtur frá staðnum, har hon tók seg upp, ávirkast ferð og alduhædd av, hvussu botndýpið broytist, meðan aldan ferðast (mynd 1).

Leygardagin 29. juni og sunnunáttina 30. juni var ógvusligur toruslættur í norðara parti av Norð-sjónum (Mynd 2), og sostatt er væl hugsandi, at tað var ein (ella fleiri) *meteotsunami*(ir), sum tók(u) seg upp í einum víðum øki í Norðsjónum leygardagin og sunnudagin.

## Vatnstøðumátingar og meteotsunami

Mynd 3 vísir vatnstøðumátingar hjá Landsverki yvir eitt tíðarskeið upp á eina viku, og tær vísa, at órógv var í vatnstøðuni leygardagin 29. juni og serliga sunnumorgunin 30. juni. Aldurnar, sum raktu Føroyar, høvdu, sum áður nevnt, eina periodu uppá 8-10 minuttir. Um vit halda fast við, at tær stavaðu úr Norðsjónum, har botndýpið er umleið 100 m, so ber til at rokna byrjanarferðina hjá aldunum til at vera umleið 35 m/s.

Sum áður nevnt ávirkast ferð og alduhædd av, hvussu botndýpið broytist, meðan aldan ferðast. Tískil hevur aldan ikki ferðast til Føroyar við eini javnari ferð. Ferðin økist, tá aldan ferðast tvørtur um Hetlandsrennuna, og minkar aftur, tá hon kemur inn á Landgrunnin. Sama er við alduhæddini, sum minkar, tá tað dýpist og økist, tá tað grynnist.

Út frá tí vit vita um periodu og botndýpi ber til at rokna út, at aldulongdin var einar 15-20 km, og at tað tók einar 4-5 tímar hjá hvørjari aldu at ferðast úr Norðsjónum til Føroya (Mynd 1). Hetta er ein lutfalsliga lág ferð og stutt alda samanborin við flóðaldur av seismiskum uppruna, t.d. oyðileggjandi alduna, sum rakti Landsynningsasia á jólum í 2004.

## Eru meteotsunamiir vandamiklar flóðaldur?

*Meteotsunami*-flóðaldur eru sjáldsamar hendingar, sum eru hugtakandi, men elva vanliga ikki til so stórar aldur, at tær gerast vandamiklar fyri fólk. Hendingarnar í Føroyum frá 2008 og 2019, sum vit hava lýst í hesi grein, vóru kanska ikki vandamiklar fyri fólk og ongar fráboðanir vóru um skaðar.

Tað er tó ikki altíð, at tað gongur so væl. Í 1979 rakti ein *meteotsunami* Nagasaki-víkina í Japan. Luft-trýstið úti í Eysturkina-havinum var fallið knappliga 3 mbar. Brúgvalagið ferðaðist 300 km móti Nagasaki-víkini á ein hátt, soleiðis at upprunaliga 3 cm høga aldan øktist til 12-14 cm við resonansi. So hvørt sum botndýpið á landgrunninum minkaði, øktist alduhæddin til 45 cm. At enda tók resonansur seg upp inni í havnalagnum í Nagasaki, soleiðis at alduhæddin vaks til 5 metrar. Trý fólk lótu lív í hesi hending.

## Niðurstøða

Flóðaldurnar, sum raktu Føroyar tann 29. og 30. juni, vaktu ans millum fólk, hóast tær ikki vóru høgar og ikki elvdu til skaða. Hetta var ein sjáldsom hending, har eygleiðingar og dátur peika ímóti, at talan var um *meteotsunami*, sum var elvd av knapp-ligum falli í lufttrýsti í sambandi við óvanliga nógvan toruslættur í Norðsjónum.

# Meteotsunami í Hvannasundi í 2008



Ein vakran summardag tann 28. mai 2008 varð Hvannasund rakt av eini løgnari hending á sjónum, sum fólk ikki mintust seg hava sæð fyrr.

Í góðveðrinum um trý-tíðina seinnapartin fór sjógvurin við eitt at streyma suðureftir og út úr sundinum við fullari ferð, so tað fjaraði í Hvannasundi sunnan fyri byrgingina. Fáar minuttir seinni streymaði sjógvurin inn aftur í sundið norður ímóti byrgingini. Bátar, sum lógu við kai, vórðu lyftir upp ímóti kaikantinum. Tað fløddi og fjaraði einar 10 til 15 ferðir í yvir ein tíma. Munurin á hægstu flóð og hægstu fjøru var 3 metrar, og tá tað fjaraði mest, stóðu fleiri bátar á turrum.

Um 10-tíðina um kvøldið komu aftur fráboðanir um flóðaldur í Hvannasundi. Hesaferð fløddi og fjaraði einar 2 til 3 ferðir, og munurin millum flóð og fjøru var umleið 1 metur.

Eins og við hendingini síðst í juni í ár, so komu eisini í mai 2008 hópur av fráboðanum um líknandi eygleiðingar ymsastaðni i Føroyum. Í Árnafirði, Borðoyarvík og Klaksvík sóu fólk knappliga harðan streym á sjónum. Á Lambavík merktu kavarar knappliga harðan streym á havbotninum. Í Kollafirði fór at fløða og fjara einar 50 cm. Sandurin gjørdist vátur, eins og tá rennisjógvur er. Í Kaldbaksfirði og Nólsoyarfirði sást harður streymur. Tað sama hendi í Sandavági. Hesin harði streymurin sást í Skopunarfirði, og í Vági løgdu fólk merki til, at sjógvur í góðveðrinum fór at skola óvanliga langt niðan.

Eisini í 2008 vóru fráboðanir úr Noregi um flóðaldur ymsastaðni fram við strondini. Jarðfeingi samskifti við Norsk Geoteknisk Institut um at savna allar eygleiðingar úr Noregi og Føroyum og gera samlaða greining út frá hesum. Tó at leingi varð hildið, at orsøkin var eitt omanlop á havbotninum, so var endaliga niðurstøðan, at hendingarnar peikaðu ikki á eitt ávíst stað, men sýntust at vísa til eitt vítt havøki millum Føroyar og Noreg. Tískil bleiv niðurstøðan, at talan mundi vera um eina meteotsunami, sum var elvd av veðrinum.

## Keldur:


NOAA. What is a meteotsunami? National Ocean Service website, https://oceanservice.noaa.gov/facts/meteotsunami.html, 23.07.2018.

An Examination of the June 2013 East Coast Meteotsunami Captured By NOAA Observing Systems. NOAA Technical Report NOS CO-OPS 079. https://tidesandcurrents.noaa.gov/publications/NOS_COOPS_079.pdf (sí t.d. mynd 1 í hesum skjali).

NRK-tíðindi 2.juli 2019: Trur dei har forklaringa på det "uforklarlege" naturfenomentet. https://www.nrk.no/sognogfjordane/trur-dei-har-forklaringa-pa-det-_uforklarlege_-naturfenomenet-1.14610997

Meteotsunami: https://www.clickondetroit.com/weather-center/science/meteotsunamis-on-the-great-lakes-heres-what-they-are-and-how-they-form

Mortensen, L. (2005). Kann ein tsunami raka Føroyar? Fróði nr. 11, s. 11-15. Føroya Fróðskaparfelag.

# GONGDIN HJÁ ÆÐU, TEISTA OG HEIÐAFUGLI Í NÓLSOY



**Jón Aldará**
JonA@savn.fo
Lívfrøðingur, Tjóðsavnið



**Jens-Kjeld Jensen**
Sjálvlærdur
náttúrufrøðingur
Heiðursdoktari á
Fróðskaparsetri Føroya

Kanningar av fuglastovnum í USA og Evropa vísa eina afturgongd hjá nógvum fuglasløgum. Sama gongd hevur verið at sæð hjá lomviga og ritu í Føroyum, og tað er væl hugsandi, at hon er tann sama hjá fleiri øðrum sløgum. Men enn hava stovnskanningar verið ov fáar og óregluligar til at gera greiðar niðurstøður. Slíkar kanningar eru alneyðugar fyri at avgera, um náttúruverndarátøk skulu setast í verk. Í hesi grein verða lagdar fram fuglateljingar úr Nólsoy, ið geva eina mynd av, hvør gongdin er hjá nøkrum av vanligastu fuglasløgunum í oynni.

## Æða og teisti

Æða og teisti eru av vanligastu støðufuglum í Føroyum. Av teimum lutfalsliga fáu ringmerktu fuglunum eru ongir afturfunnir uttanfyri Føroyar, og tí verður roknað við, at føroysku æðurnar og teistarnir í stóran mun halda til undir Føroyum alt árið. Slíkt støðufesti stuðlar undir, at hesi eru serføroysk *faeroeensis*-undirsløg. Tó eru ongar ítøkiligar dátur tøkar um stovnsstøddina hjá hesum heimligu sløgum í dag og tískil heldur ikki um, hvussu stovnarnir eru fyri.

Árini 2004-2007 og aftur í 2018 taldi Jens-Kjeld Jensen æður og teistar frá báti fram við Nólsoy. Hvørt av hesum árunum varð talt eina ferð um mánaðarskiftið apríl-mai. Fyri hvørja teljing sóust støðugt færri æður, og í 2018 var talið av æðum minkað úr 284 niður í 135 – eina lítla helvt – síðan 2004 (Mynd 1). Hjá teistanum sást hinvegin ein øking við umleið 75 % frá 2004 til 2006, men talið minkaði aftur í 2007, og sum heild er onki týðiligt mynstur í gongdini frá 2004 til 2018.






Teisti finnur sær føði í taraskógum fram við landi, og serliga ofta sæst hann við tarabrosmu í nevinum. Hann er tí ikki – sum fleiri aðrir føroyskir sjófuglar – bundin at nebbasildini og noyðist ikki at kappast stórvegis um føði við aðrar fuglar. Eisini reiðrast hann í fjaldum og fjarlagdum støðum sum t.d. fjøru, gjáum og urðum, har hann finnur sær sprungur og krókar, og er hann tí allarhelst væl vardur ímóti øðrum fuglum á búplássunum. Rotta kann koma til, men hon finst enn bert á oyggjum við vegsambandi.

Æða livir heilt øðrvísi, hóast hon sæst um somu leiðir. Hon leitar eftir føði í sandbotni, har hon finnur krækling og onnur botndjór. Slík føðistøð kunnu í nógv størri mun enn fjøra vera ávirkað og oydd av alivirksemi á firðunum. Hetta verður mett sum ein tann størsta hóttanin móti æðustovnunum aðrastaðni í Evropa. Undir reiðring bølir æðan í fjøruni og í haganum ímillum heiðafugl. Hon lítir á sín brúna lit og goymir seg sum frægast, men teistin er uttan iva betur vardur, har hann er. Tó er æðan størri og fær møguliga vart seg betur.

## Heiðafuglur í Nólsoy

Í 2018 taldi Jens-Kjeld Jensen heiðafuglapør á reiðursplássunum í allari oynni. Hetta var fyri at samanbera við einastu heiðafuglateljingina, sum áður hevði verið gjørd í oynni. Tað var í 1981, tá Náttúrugripasavnið skipaði fyri eini heiðafuglateljing um alt landið. Her hava vit viðgjørt fimm tey vanligastu heiðafuglasløgini í Nólsoy í dag; tjaldur, lógv, spógva, skúgv og grágás.

Teljingin vísir, at tjaldrið er farið úr 214 pørum í 1981 niður í 34 pør í 2018 (Mynd 2). Hetta er ein minking við 84 %. Lógv fylgir tjaldrinum og er minkað 61 %, meðan hinir heiðafuglarnir hava øðrvísi gongd (Mynd 3). Spógvin stendur mestsum í stað, meðan skúgvurin er vaksin úr 1 upp í 6 pør. Grágás var ongin í 1981, men nú reiðrast 11 pør í oynni.

Tað tykist serliga vera vaðfuglastovnarnir, ið eru minkaðir. Tó er spógvastovnurin ikki ávirkaður á sama hátt sum lógv og tjaldur. Hesi eru øll flytifuglasløg og eru í vetrarvist á ymsum støðum, har álítandi føðikeldur tryggja, at fuglurin kann koma aftur á búplássini at nørast. Føðigrundarlag og onnur umhvørvislig viðurskiftir eru tó broytilig og kunnu versna í ávísum vetrarplássum, og tí hava onkur flytifuglasløg helst størri avbjóðingar enn onnur. Grágás og skúgvur hava hinvegin søguliga verið týnd í Føroyum í 19. og 20. øld, men hava fingið betri frið seinastu áratíggjuni. Hetta kann vera ein orsøk til, at hesi sløg nú ganga fram.

**Mynd 1:** *Æður (svart) og teistar (grátt) kring Nólsoy mánaðarskiftið apríl-mai í 2004, 2005, 2006, 2007 og 2018.*




## Stórur tørvur á fuglateljingum

Heiðafuglateljingarnar í 1981 og í 2018 vóru ikki framdar av somu fólkum og mannagongdirnar vóru neyvan heilt eins. Hóast samanberingarnar eiga at takast við fyrivarni, so vóru telingarnar sera einfaldar, og úrslitini endurspegla uttan iva væl gongdina í Nólsoy. Æða og teisti vórðu tald sum einstakir fuglar á sjónum kring oynna. Ringmerking hevur víst, at teisti reikar nakað millum oyggjarnar, meðan ringmerkt æða ongantíð er fráboðað meira enn 4 km frá staðnum, har hon varð merkt. Tað er tí møguligt, at teljingarnar betur umboða støddina av æðustovninum í nærøkinum enn av teistastovninum.

Hóast talan bert er um hesa einu oynna, so er væl hugsandi, at hon endurspeglar gongdina í Føroyum sum heild. Í hvussu er kunnu vit staðfesta, at gongdin hjá æðu og tjaldri samsvarar væl við gongdina aðrastaðni í Evropa. Har eru stovnarnir gingnir somikið aftur, at hesi bæði fuglasløg eru mett at vera viðbrekin (vulnerable) í reyðlistanum hjá IUCN fyri Evropa. Hinvegin verður evropeiski láarstovnurin ikki mettur at vera minkandi, hóast tølini úr Nólsoy vísa greiða minking.

Um heildargongdin hjá m.a. æðu, tjaldri og lógv í Føroyum líkist henni í Nólsoy er ikki vist. Tó vísir ein heiðafuglateljing í Skúvoy í 2010 eina líknandi gongd fyri hesi sløg. Fyri at staðfesta hetta krevjast tó landsfevnandi stovnskanningar, ið síðani kunnu undirbyggja tey átøk, ið kunnu vera neyðug fyri at verja og nøra um hótt fuglasløg.

**Mynd 2:** *Tal av tjaldurspørum á Nólsoy í 1981 og 2018.*

**Mynd 3.** *Tal av láar- (reytt), spógva- (grønt), skúgva- (korkalitt) og grágásapørum (blátt) í Nólsoy í 1981 og 2018.*




**Mynd 2**




**Mynd 3**



## Seyðabit og heiðafuglur

Kanningar úr m.a. Hetlandi og USA hava víst, at seyður og neyt kunnu eta egg og ungar hjá heiðafuglum. Haraftrat bendir ein kanning úr Hetlandi á, at yvirbit á graslendi kann hava við sær økt trýst frá ránsdjórum á bølandi fugl, helst orsakað av, at reiðrini eru verri fjald. Ein slík sínámillum ávirkan millum heiðafugl og seyð hevur ivaleyst verið, síðan seyðurin kom í oynna, men tað er sannlíkt, at hetta samspælið er broytiligt. Turrur bøur verður skjótari yvirbitin, og um turkur er tíðliga á summarinum, kann seyður bæði vera ein beinleiðis hóttan og møguliga eisini gera umstøðurnar verri hjá heiðafugli at finna dygdagóð reiðurspláss, har eggini eru fjald.



## Flatmaðkur og fuglalív

Nýsælendski flatmaðkurin (*Artioposthа triangulata*) kom til Føroya fyri meiri enn 30 árum síðan og varð fyrstu ferð sæddur í Nólsoy í 1994. Nú eru tað nógv sum spyrja, hvar allur reyðmaðurin er blivin av. Einfalda svarið er, at hann verður etin av flatmaðkinum. Reyðmaðkur er góð føði hjá tjøldrum, og tað er væl hugsandi, at eygleidda afturgongdin í tjaldursstovninum er orsakað av flatmaðkinum. Ábendingar eru um, at tjaldrið serliga er afturfarið innangarðs. Her vanta tó eisini kanningar.

*Tøkk til Marnar á Skúr fyri hjálp við fuglateljingum og Leiv Janus Hansen fyri ráðgeving.*

## Bókmentir

BirdLife International 2015. Haematopus ostralegus. The IUCN Red List of Threatened Species 2015: e. T22733462A66718028. Downloaded on 31 October 2019.

BirdLife International 2015. Pluvialis apricaria. The IUCN Red List of Threatened Species 2015: e. T22693727A60063835. Downloaded on 31 October 2019.

BirdLife International 2015. Somateria mollissima. The IUCN Red List of Threatened Species 2015: e. T22680405A59970628. Downloaded on 31 October 2019.

Hammer, S., Madsen, J. J., Jensen, J-K., Pedersen, K. T., Bloch, D., og Thorup, K. 2014. Færøsk trækfugleatlas. Fróðskapur.

Hayhow, D. B., Ausden, M. A., Bradbury, R. B., Burnell, D., Copeland, A. I., Crick, H. Q. P., Eaton, M. A., Frost, T., Grice, P. V., Hall, C., Harris, S. J., Morecroft, M. D., Noble, D. G., Pearce-Higgins, J. W., Watts., O., og Williams, J. M. The state of the UK's birds 2017. The RSPB, BTO, WWT, DAERA, JNCC, NE and NRW, Bedfordshire.

Jensen, J-K. 2001. Flatmaðkur í Nólsoy. Frágreiðing frá Føroya Fuglafrøðifelag 15: 16.

Nack, J. L., og Ribic, C. A. 2005. Apparent predation by cattle at grassland bird nests. The Wilson Journal of Ornithology 117(1): 56-62.

Olsen, B. 2011. Heiðafuglur í Skúvoy 2010. Frágreiðing frá Havstovuni.

Rosenberg, K. V., Dokter, A. M., Blancher, P. J., Sauer, J. R., Smith, A. C., Smith, P. A., Stanton, J. A., Panjabi, A., Helft, L., Parr, M., og Marra, P. P. 2019. Decline of the North American avifauna. Science 366(6461): 120-124.

van der Wal, R., og Palmer, S. C. F. 2008. Is breeding of farmland wading birds depressed by a combination of predator abundance and grazing? Biology Letters 4(3): 256-258.

# FØROYSKA HARAN OG HARUVEIÐAN Í FØROYUM

Haran, sum í dag er í Føroyum, er snjóhara (*Lepus timidus*). Hon verður eisini nevnd fjallahara (En: Mountain hare) ella bláhara (En: Blue hare). Hon varð innflutt til Føroya í 1855 frá norska økinum Kragerø í Oslofjørðinum (Mynd 1). Fýra haruungar vórðu settir út í Hornabø í Havn og runnu haðani niðan á Kirkjubøreyn. Harurnar vuksu skjótt í tali og vórðu síðani fluttar til hinar oyggjarnar



**Eyðfinn Magnussen**
EydfinnM@setur.fo
Lektari í lívfrøði,
Fróðskaparsetur Føroya

Í dag finst haran í øllum oyggjunum uttan í Koltri, Stóru Dímun og Lítlu Dímun. Umframt í Føroyum finst snjóharan í dag í Skotlandi, Írlandi, Skandinavia, Finnlandi, Norðurrusslandi og Sibiria. Smáir harustovnar eru eisini í Alpunum og á japansku oynni Hokkaido (Mynd 2).

Tað var Carl Emil Dahlerup, sum var amtmaður í Føroyum 1849–1861, ið kom við haruni. Dahlerup søkti danska Innanríkisráðið um peningaligan stuðul til at seta harur út í Føroyum, tí hann helt, at harurnar kundu gerast eitt gott matískoyti hjá føroyingum.

Í umsóknini til Innanríkisráðið grundgevur hann millum annað við, at harurnar kunnu "*... blive til gavn og behagelighed for mange her på landet*". Í brævi, dagfest 7. november 1853, skrivar Dahlerup millum annað "*...et beløb af 20 à 30 rigbanksdaler til derfor at få indkøbt og overført hertil fra Norge eller Shetland en del unge levende harer.*"

Umsóknin verður játtað, og í brævi 12. september 1855 sendir Dahlerup kvittan til Innanríkisráðið "*For 5 levende hareunger med briggen Ursus minor fra Kragerø i Norge 4 rigsdaler. For hareungernes pasning om bord og ilandbringelse har jeg betalt 1 rbd. 32 sk., i alt 5 rbd. 32 sk*". Av teimum fimm haruungunum, sum vórðu sendir úr Norra, doyði tann eini á ferðini til Føroya. Hinir fýra vórðu settir út í Hornabø.

Hendan íløgan, áljóðandi 5 ríkisdálar og 32 skillingar, man vera besta íløgan, sum nakrantíð er gjørd í Føroyum. Hesir pengarnir eru grundarlagið undir allari haruveiðu, sum í dag er í Føroyum, og eru eisini orsøkin til, at haruhagarnir í Føroyum á hvørjum ári verða seldir fyri fleiri hundrað túsund krónur tilsamans, teir dýrastu fyri 20-30.000 kr. Sostatt hava hesir fimm dálarnir givið avkast upp á fleiri milliónir krónur í tey gott 150 árini, sum haruhagar hava verið seldir í Føroyum.




**Mynd 1:** *Haran, sum í dag er í Føroyum, varð upprunaliga innflutt frá Kragerø-økinum í Oslofjørðinum í Norra. Hetta var í 1855.*



**Mynd 2:** *Útbreiðsla av snjóharuni (Lepus timidus) kring knøttin. Umframt í Føroyum, finst snjóharan í dag í Skotlandi, Írlandi, Skandinavia, Finnlandi, Norðurrusslandi og Sibiria og á japansku oynni Hokkaido. Eisini finst ein minni harustovnur í Alpunum. Eingin hara er í Íslandi.*

Áðrenn snjóharan varð innførd til Føroyar í 1855, høvdu royndir í 1831 verið gjørdar at seta út danskar harur í Føroyum. Donsku harurnar eru av slagnum brúnhara, eisini nevnd evropeiska haran *(Lepus europaeus)*. Hon livir í heitari londum og er spjadd um tað mesta av Evropa, har Danmark er millum tey norðastu londini. Donsku harurnar trivust tó ikki og doyðu tí útaftur. Donsku harurnar vórðu settar út seint á heysti, og bara eitt par varð sett út. Hetta hevur uttan iva gjørt, at útsetingin miseydnaðist. Hevði útsetingin í staðin verið um várið ella um summarið, og høvdu fleiri harur verið settar út, hevði útsetingin av donsku harunum kanska hepnast betur.

## ÚTSJÓND

Haran er 46-61 cm long og vigar í miðal 2,7 kg. Frambeinini eru stutt og kløn, afturbeinini eru afturímóti long og kraftig. Oyrasnippurin er svartur. Haran hevur stór útstandandi eygu og sær sera væl, bæði í myrkri og í dagslýsi.

Oyruni eru stór og uppstandandi (Mynd 3) og haran hoyrir sera væl. Oyruni kunnu, hvørt í sínum lagi, snarast ymsar vegir, so haran altíð hoyrir, hvat fyriferst rundan um seg. Hoyrir hon okkurt, vendir hon sær ímóti ljóðinum við útspílaðum oyrum og metir um vandan.

Haran skiftir lit við árstíðini. Um summarið er hon brúnlig, men tá november mánaður nærkast, gerst liturin ljósari, og hon skiftir frá tí brúna til tann gráa vetrarlitin (Mynd 4). Litbroytingin byrjar aftanífrá. Fyrst tær vaksnu, síðani ungarnir (Mynd 5).

Tað eru broytingar í ljósi og hita í umhvørvinum, sum stýra litbroytingini hjá haruni. Tá samdøgrið hevur fingið eina ávísa longd av ljósi og myrkri, byrjar litskiftið. Hvussu langa tíð, skiftið tekur, er stýrt av hitanum. Kaldari veðrið er, longri tíð tekur litskiftið.



**Mynd 3**: *Føroysk hara, 19. januar 2019. Mynd: Harald Bjørgvin*

## ÆTTARBREGÐI

Tær fyrstu harurnar, sum komu til Føroyar í 1855, vóru snjóhvítar um veturin (Mynd 6), men longu í 1860-árunum vórðu nakrar blágráar vetrarharur sæddar. Hesar vórðu nevndar bláharur. Bláharurnar vuksu skjótt í tali og trokaðu so líðandi ta hvítu snjóharuna burtur. Í 1882 vóru 75 % av teimum skotnu harunum gráar, í 1890 vóru 95 % gráar, og veturin 1916-1917 varð tann seinasta snjóharan skotin í Føroyum.

Litbroytingin, sum hendi við føroysku haruni, liggur í genunum hjá haruni. Føroysku harurnar vórðu innfluttar frá einum øki í Norra, har bæði snjó- og bláharur liva. Royndir við snjóharu og bláharu vísa, at genið fyri hvíta vetrarfeldin altíð er ráðandi. Hevur tí bara ein av teimum fýra uppsleptu snjóharunum havt bláharu-ættarbregði í sær, hevur hetta genið nørt um seg í tí grýtuta føroyska umhvørvinum og trokað snjóharu-genið burtur. Tí gingu bert 60 ár, so var tað áðurráðandi snjóharuættarbregðið burtur.

## ATFERÐ OG FØÐI

Haran er virknast teir myrku tímarnar á samdøgrinum. Um dagin sita tær inni, men í skýmingini fara tær út at leita sær føði (Mynd 7). Haran er eitt gnagdjór og etur plantur, grøs, stør, urtir og tróllakampar. Eisini etur hon knubbar og endaknappar á runnum og trøum.

Haran livir vanliga ikki í flokki, eins og kaninir gera tað, men er fyri tað mesta einsamøll. Í makingartíðini er tó øðrvísi. Tá sæst ein serlig atferð hjá haruni. Tær renna hvør eftir aðrari og gera seg upp, og tá síggja vit tær eisini um dagin. Tá kunnu fleiri, upp til 10, vera í einum flokki. Hetta eru vanliga harufrensar, sum ganga aftan á einari løðu (hon-haru), og royna at koma sær framat fyri at para seg við henni.

## NØRING

Haran hevur ikki ein fastan maka, men kann para seg við fleiri ymiskum frensum gjøgnum árið. Hon gongur kviðin í einar sjey vikur (Mynd 8A). Haran leggur tríggjar ferðir um árið: Fyrsta løgan er í februar-mars, onnur í mai-juni og triðja løgan er í august-september. Tveir til tríggir ungar eru í hvørjari løgu.

Haran kann, um somu tíð, ganga við fostrum, sum eru ymisk til aldurs (Mynd 8B). Um umstøðurnar eru keðiligar, og útlitini tí eru vánalig fyri, at allir ungarnir fara at yvirliva, kann haran upptaka (absorbera) summi av fostrunum, sum eru í móðurlívi. Á henda hátt fer orka og tíð ikki til spillis, sum krevst, fyrst at ganga við fostrunum og síðani uppfostra ungar, sum kortini ikki yvirliva.





**Mynd 4:** *Liturin á haru broytist við árstíðini. Um summarið eru tær brúnligar á liti, um veturin gráligar. Á myndunum síggjast tvær harur. Myndin vinstrumegin er tikin 19. mai av einari haru í summarbúna. Myndin høgrumegin er tikin 7. desember av einari haru í vetrarbúna.*





**Mynd 5:** *Liturin á harum, sum vórðu skotnar 5. november 2016. Litbroytingin byrjar aftanífrá. Fyrst hjá teimum vaksnu, síðani hjá ungunum.*

Ungarnir eru kynsbúnir, tá ið teir eru átta mánaðir gamlir. Við støði í vektini á harunum, sum verða skotnar í november og desember mánað, sæst, at tær vaksnu harurnar frá heystløguni viga í miðal 2 kg, summarløgan 2,5 kg, meðan várløgan og tær, ið eru meira enn ársgamlar, viga í miðal 3 kg

## ALDUR Á HARU

Tá menn koma aftur av haruveiðu og dagsins fongur liggur á gólvinum, meta teir ofta um veiðuna. Tá ber eisini til at staðfesta, hvussu gamlar tær skotnu harurnar eru. Hetta kann gerast við at føla á fótliðin á frambeinunum á haruni (Mynd 9).

## LIVITÍÐ

Hvussu leingi livir ein hara? Hetta er ein spurningur, sum eg sum haruáhugaður ofta fái. Men hvussu áseta vit livitíðina hjá eini haru?

Ein máti, sum ofta verður nýttur, er "miðallivitíð" ella "hægsti aldur", men hesi tølini siga í veruleikanum sera lítið um, hvussu langa livitíð ein haruungi kann vænta sær, tá hann kemur í verðina, tí deyðiligheitin hjá haru er oftast størst fyrsta part av lívinum, men minkar so munandi, sum haran gerst eldri (Mynd 10).Tí er tað minni enn helvtin av teimum nýløgdu haruungunum, sum liva til "miðalaldurin", og bara evarska fáir, sum nærkast "hægsta aldrinum" (Mynd 10).

Ongar kanningar eru gjørdar av, hvussu stórur partur av føroysku harunum yvirlivir gjøgnum árið, ella hvussu aldurssamansetingin er í føroyska harustovninum. Tí kunnu vit heldur ikki neyvt svara spurninginum, hvussu leingi ein føroysk hara livir, men vit kunna hyggja at, hvat granskarar aðrastaðni hava funnið fram til.

Um okkara leiðir er haran best kannað í Skotlandi. Har vísa kanningar, at longu eftir einum ári var megin-





**Mynd 6:** *Tær fyrstu harurnar, sum komu til Føroya, vóru snjóhvítar um veturin. Men nøkur fá ár seinni vórðu harur sæddar í Føroyum, sum høvdu ein gráan lit um veturin. Vinstrumegin sæst ein hvít vetrarhara úr Norra. Soleiðis littar vóru tær fyrstu føroysku harurnar um veturin tey fyrstu árini. Hetta broyttist tó. Høgrumegin er ein grá føroysk vetrarhara frá 7. desember, soleiðis sum vit kenna tær i dag.*

parturin av ungunum deyður. Hetta sást eisini aftur, tá skotið varð, tí einans 23 % av teimum skotnu harunum vóru eldri enn 16 mánaðir.

Kanningar av harum í Svøríki vísa, at í miðal vóru tað bara 20 % av teimum nýløgdu haruungunum, sum vóru á lívi várið eftir. Kanningin vísti eisini, at fellið var tengt at, hvussu nógv rovdjór vóru í økinum. Árini, tá fá rovdjór vóru í økinum, yvirlivdu í miðal 42 % av teimum vaksnu harunum vetrarnar, men tá nógv rovdjór vóru í økinum, vóru tað einans 19 % av teimum vaksnu harunum, sum yvirlivdu vetrarnar.

At fellið er stórt fyrsta part av lívinum ger, at miðalaldurin í stovninum ikki verður serliga høgur. Ein kanning av einum harustovni í Japan vísti, at har var miðalaldurin á harunum einans 0,83 ár.

Hóast ongar kanningar eru gjørdar av aldrinum hjá føroyskum harunum, kunnu vit rokna við, at livitíðin hjá føroysku haruni minnir um tað, sum granskarar hava funnið fram til í Skotlandi, Svøríki og í Japan.

## METING AV LIVITÍÐINI HJÁ DÝRUM

Sjálvt um ongar kanningar eru gjørdar av livitíðini hjá dýrum í einum øki, so kunnu vit tó, við at brúka vit og skil, gera okkum eina leysliga meting um livitíðina. Hetta kunna vit gera við støði í, hvussu nógvar ungar ein mamma leggur um árið. Tí sæð yvir fleiri ár, so er stovnurin hjá teimum flestu dýrasløgunum nokkso støðugur.

Hetta merkir, at um bara ein av teimum løgdu hon-ungunum yvirlivir og sjálvur fær ungar, so kann hesin ungin yvirtaka plássið hjá mammuni, og stovnsstøddin verður óbroytt í næsta ættarliði. Um tveir av teimum løgdu hon-ungunum yvirliva, so tvífaldast stovnurin, og um tað í miðal er minni enn ein hon-ungi, sum yvirlivir, so minkar stovnurin.

Hetta er jú ein rættiliga einfaldur máti, men hann gevur okkum eina góða ábending um, hvussu leingi dýr liva. Fleiri ungar, dýr fáa hvørja ferð, styttri er miðallivitíðin hjá hesum dýraslagnum.

Latið okkum nýta hendan útrokningarháttin til føroysku haruna. Haran verður kynsbúgvin eftir einum ári (12 mánaðum). Hon leggur tríggjar ferðir um árið, tveir til tríggjar ungar í hvørjari løgu. Siga vit, at hon fær 7 ungar um árið, so fær hon í miðal 3½ hon-ungar. Býta vit 12 mánaðar við 3½ , so koma vit fram til, at miðallivitíðin hjá einari haru einans er 3 til 4 mánaðar.

## HARUVEIÐAN Í FØROYUM

Haruveiðan í Føroyum er skipað sambært løgtingslóg nr. 128 frá 25. oktober 1988 um haruveiðu.

Lógin er sera stutt; einans tvær greinar, umframt sektarmøguleikar og gildiskomu. Í grein eitt verður ásett, at loyvt er at skjóta haru í tíðini 2. november til 31. desember, báðir dagar íroknaðir. Stykki tvey og trý í hesi greinini umrøða møguleikan at friða.

Í grein 2 verður sagt, at haruveiðan má bert fara fram í dagsljósi gerandisdagar, og loyvt er bert at nýta høglbyrsu. Annars eru ongar bindingar í lógini, og tað er sostatt frítt hjá harumonnum at skjóta í tí hagaparti, har teir antin hava fingið ella keypt sær rættindi.

Ofta verður sagt, at tað ikki er loyvt at skjóta harur í Føroyum við fimmskotsbyrsu. Men hetta er ikki rætt.






**Mynd 7:** *Summarið 2014 vórðu nøkur sjálvvirkandi myndatól sett upp framman fyri nøkrum harusetrum í haganum (myndin vinstrumegin). Tá haran rørir seg framman fyri setrið, verður ein mynd tikin og tíðin skrásett á myndini. Á henda hátt ber til at fylgja við aktivitetinum hjá haruni. Á myndini høgrumegin sæst, nær á samdøgrinum harurnar hava víst seg framman fyri harusetrini í tíðarskeiðinum frá 21. apríl til 24. mai 2014. Um dagin var friðarligt, men aftan á klokkan 10 um kvøldið var størri aktivitetur.*







**Mynd 8:**
**A)** *Tvey fostur í haru, skotin 17. des. 2011 (Mynd: Tórhallur Magnussen).*

**B)** *Sjey fostur funnin í haru, sum varð skotin 20. nov. 2016 (Mynd: Petur Sofus Juul).*

Í løgtingslógini um fuglaveiðu verður sagt í grein 16 "*Tað er ikki loyvt at veiða (fugl) við byrsu, sum hevur meira enn 2 skot*".

Í løgtingslóg um haruveiðu verður hinvegin einans sagt at "*.... loyvt er bert at nýta høglbyrsu*". Í lógartekstinum um haruveiðu eru sostatt ongar avmarkingar í talinum av skotum, sum byrsan kann hava. Tískil er loyvt at skjóta harur við fimmskotsbyrsu í Føroyum.

## HARUHAGAR

Rættindini til haruskjóting í Føroyum liggja hjá teimum, ið eiga hagan: Er tað landsjørð, er tað hjá bóndunum. Er talan um ognarhaga, so eru tað eigararnir av haganum, sum eisini hava rættindini til haruskjótingina. Hesi rættindi kunnu teir so sjálvir brúka, ella teir geva ella selja hesi rættindi til onnur.

Vanligt er, at haruhagar verða seldir, nakað áðrenn harutíðin byrjar. Sum oftast fyri eitt ár í senn, men tað kemur eisini fyri, at hagarnir verða seldir fyri fleiri ár. Eisini er vanligt, at fjallmenn sleppa at skjóta hjá bóndanum, har teir ganga á fjall.

Í Føroyum eru tilsamans umleið 455 hagar, har møguleiki eisini er fyri at skjóta harur (Mynd 12). Men harur verða ikki skotnar í øllum hesum høgunum. Vanliga verður skotið í 200 til 300 høgum kring landið.

Hvussu stórur áhugin er fyri at skjóta, valdast eisini, hvussu nógv er at fáa. Tess meira er at fáa, størri verður eisini áhugin at skjóta. Í 2018, sum var eitt miðal ár til haru, skutu teir harur í 247 høgum kring landið. Upplýst var eisini, at í 34 høgum hevði eingin skotið tað árið (Mynd 12).

## VEIÐAN

Hóast menn hava skotið harur í Føroyum síðani umleið 1860, so finnast eingi almenn tøl, sum vísa, hvussu veiðan hevur verið hesi 160 árini. Síðani 2012 havi eg skrásett haruveiðuna í Føroyum (Mynd 11). Hesi árini hevur samlaða veiðan verið millum




**Mynd 9:** *Tað ber til at staðfesta aldurin á eini haru við at føla á fótliðin á frambeinunum á haruni. Tá haran er heilt ung, er ein knykil (ella runnur) framman á albogaleggínum ímóti fótliðinum (reyðu pílarnir). Knykilin minkar, sum haran eldist, og leggurin gerst alt spískari sum frá líður. Roknast kann við, at hann er heilt burtur, tá haran er umleið átta mánaðir gomul. Tá er albogaleggurin heilt slættur at nema við. Út frá hesum ber til at staðfesta, um haran er:*

- **Yngri enn 5 mánaðir:** *Tær hava ein stóran rundan knykil. Tað eru tær yngstu harurnar, tær frá triðju løguni, sum er í august – september (heystløguni).*
- **5 til 8 mánaðir:** *Tær hava ein spískan knykil. Tær frá aðru løguni, sum er í mai – juni (summarløguni).*
- **Eldri enn 8 mánaðir:** *Tær hava ongan knykil. Tað eru tær gomlu harurnar frá árinum fyri og tær frá fyrstu løguni, sum er í februar – mars (várløguni)*

2.950 og 9.318 harur. Í miðal hevur veiðan hesi sjey árini verið 5.843 harur um árið.

Tað er sera ymiskt, hvussu nógvar harur vórðu skotnar í teimum ymisku høgunum kring landið. Frá einari haru til 280 harur í tí haganum, har teir hava fingið mest. Tað var í Skálatoftahaga í 2017 (Mynd 13).

Av teimum 247 høgunum, har skotið varð í 2018, varð helvtin av samlaðu árligu veiðuni skotin í 45 høgum. Av hesum vórðu 1.335 harur (25 %) skotnar í 17 teimum bestu høgunum. Tey fyrstu 25 % av harunum, har teir fingu fæst harur, vórðu skotin í 125 hagapørtum.

Hóast veiðan er sera ymisk frá haga til haga, so eru tað tó nakrir hagar, sum skara framúr, har teir altíð fáa nógvar harur. Hesir hagarnir liggja sum oftast á Topp 10-listanum yvir bestu haruhagar í Føroyum (Mynd 13).

Áhugin at skjóta harur í Føroyum er størstur í Streymoynni. Har verður ein sløk helvt av øllum teimum føroysku harunum skotnar (Myndi 14). Áhugin fyri haruskjóting er eisini stórur í Vágum og í norður Eysturoynni og eisini fleiri staðni í Norðuroyggjum. Í suður-Eysturoynni, kring Skálafjørðin, í Sandoynni, Suðuroynni og á summum av teimum smærru oyggjunum verður lítið skotið (Mynd 12 og 14).

Vestmanna er tann bygdin í Føroyum, har flestu harurnar verða skotnar. Í 2018 skutu vestmenningar tilsamans 436 harur, sum teir fingu á 44 túrum (Mynd 15). Men hetta er bert góður triðingur av tí, sum vestmenningar fingu í 2014, tá teir skutu 1.120 harur á 74 túrum.

Aðrar bygdir í Føroyum, har áhugin fyri haruskjóting eisini er stórur, eru allar bygdirnar í Vágum, Kvívík, Saksun, Eiði, Viðareiði, Klaksvík og eisini í summum av bygdunum í Sundalagnum (Mynd 12 og 15).




**Mynd 10:** *Tá lívfrøðingar skulu staðfesta, hvussu leingi dýr liva, verður hetta oftast gjørt við at fylgja lívsgongdini hjá einum heilum árgangi av dýrum. Eitt merki verður sett á dýrini, stutt eftir at tey eru komin í verðina, og so verður fylgt við, hvussu leingi hvørt einstakt dýr livir, og hvussu talið av dýrum í árganginum so líðandi minkar, líka til tað seinasta dýrið er deytt. Við støði í hesum úrslitunum ber til at gera útrokningar um livitíðina, og hvussu livilíkindini broytast við tíðini, bæði gjøgnum árið og frá einum ári til annað. Gongdin í lívinum hjá einum árgangi av harum líkist tí, sum er víst á hesi myndini. Nógvir ungar doyggja at byrja við, men hjá teimum, sum yvirliva fyrstu tíðina í lívinum, eru útlitini rímiliga góð fyri, at tær eisini koma at liva eitt sindur leingi.*




**Mynd 11:** *Samlaða talið av harum, sum eru skrásettar at vera skotnar í Føroyum árini 2012 til 2018. Í miðal hevur veiðan hesi sjey árini verið 5.843 harur um árið.*

**Heimildir**


Magnussen, E. (2019). Haruveiðan í Føroyum 2018, og søgan um rýpurnar, sum fyrr vóru í Føroyum. NVDrit 2019:02, s. 1-102.

Magnussen, E. (2017). Ymiskt um føroysku haruna og haruskjóting í Føroyum. NVDrit 2017:01, s. 1-14.

**Mynd 12:** *Samlaða talið av skrásettum skotnum harum, sum vórðu skotnar í teimum ymisku høgunum í Føroyum í 2018. Samlaða talið gjørdist 5.136 harur, sum vórðu skotnar í 247 høgum kring landið. Í 34 høgum varð ikki skotið.*






**Mynd 13:** *Myndin vísir talið av harum, sum eru skotnar í tí haganum, har teir skutu flestar harur, árini frá 2012 til 2018. Reyða linjan vísir túratalið.*




**Mynd 14:** *Tal av skotnum harum í Føroyum í 2018, býtt sundur á oyggjar.*




**Mynd 15:** *Tær tíggju bygdirnar í Føroyum, har flestar harur vórðu skotnar í 2018.*



# KONSEPTIÐ FØROYAR

## Gevur føroyskum konum eina rødd

Fólkaflyting er eitt fjøltáttað og samansett fyribrigdi. Tað kunnu vera nógv ymisk samfelagslig, søgulig og persónlig viðurskifti, sum hava ávirkan á, hvørji eyðkennir fólkaflyting ímillum ávís geografisk øki hevur. Karin Jóhanna Knudsen hevur í eini ph.d.-ritgerð latið føroyskar konur seta orð á, hvat eyðkennir flyting hjá føroyskum konum millum Føroyar og Danmark.

Kanningin vísir millum annað, at Danmark er tað natúrliga staðið, ið føroyskar konur flyta til, um tær ynskja at broyta ella betra um síni lívskor fyri at klára seg sjálvar. Tó hevur sosiala bakgrundin hjá teimum stóra ávirkan á, hvussu henda drívmegin tekur seg út í praksis.



Mynd: Ari Magg

Seinastu nógvu árini hevur verið stúrt fyri fólkasamansetingini í Føroyum. Nógv sjónarmið eru sjálvsagt frammi um, hvussu føroyska samfelagið møguliga kann broytast, men „kvinnuhall" og „kvinnuleki" og hvussu hetta fer at ávirka føroyska samfelagið grundleggjandi í framtíðini er eitt høvuðsevni. Eitt nú skrivar føroyska Almannaráðið í faldara um javnstøðupolitikk: „Nærum 2000 færri kvinnur enn menn búgva í Føroyum, hóast fólkatalið er hækkað seinnu árini [...] Okkum tørvar kvinnur í burðarførum aldri, skal samfelagið halda áfram at vaksa."

Kortini er tað so, at sjónarmiðini og royndirnar, sum føroyskar konur sjálvar hava, ikki fylla nógv í kjakinum. Endamálið við ph.d.-ritgerðini, *Fending for yourself* [At klára seg sjálva], er at geva føroyskum konum eina rødd og at seta orð á, hvat eyðkennir flyting hjá føroyskum konum ímillum Føroyar og Danmark.

Fólkaflyting er eitt fjøltáttað og samansett fyribrigdi. Tað kunnu vera nógv ymisk samfelagslig, søgulig og persónlig viðurskifti, sum hava ávirkan á, hvørji eyðkennir fólkaflyting ímillum ávís geografisk øki hevur. Tá føroyskar konur við sínum lívssøgum seta orð á, hví tær flyta úr Føroyum til Danmarkar, koma tríggjar grundgevingar til sjóndar: *Trupulleikar í familjuni og nærsambondum, vantandi møguleikar at vinna til lívsins uppihald og útbúgving.*

Útgongdsstøðið í kanningini hevur verið at taka støði í eini fatan av samfelag, ið ikki er avmarkað til at skilja Føroyar og Danmark sum tvær sundurskildar eindir ella tvey sundurskild íløt, men sum eitt savnað sosialt øki at virka í. Lívssøgurnar hjá konunum og kanningini sum heild geva eina góða lýsing av, hvørji eyðkennir eru við tvívegis streyminum av fólki og flyting, ið fer fram millum Føroyar og Danmark, og hvussu tilknýtið hjá konunum til Føroyar og sambandið við tey, tær eru góðar við, verður viðlíkahildið og varðveitt.

## „Eg sakni ikki konseptið Føroyar"

*Føroyar [sic] leingist eg slett ikki eftir [...] Ikki landið Føroyar. Nei, tað geri eg ikki [...] Eg leingist ólukksáliga eftir fólkinum og bara tað [...] Tá eg sigi landið, so meini eg simpulthen konseptið, Føroyar [sum] tað er uppbygt uppá [...], tað er so nógv uttanumtos [...] Tað kemur ræðuliga nógv av hesi skilsmissuni hjá mær*



**Karin Jóhanna L. Knudsen**
karinjohannalknudsen@gmail.com
PhD í samfelagsvísindum

*[...] Eg eri fødd og uppvaksin í Føroyum, og eg havi búð har, eri gift og fekk míni børn og havt mítt arbeiðslív og verið, haldi eg sjálv, ein góður borgari. Og so komi eg í eina skilsmissu. Eg veit gott [...], tað kann eingin annar gera nakað við. Men so er maðurin eitt sovorðið reyvarhol ímóti mær [...] og hann sleppur bara at gera, sum hann vil.*

Soleiðis greiðir ein føroysk kona frá, tá hon sigur frá sínari lívssøgu og hví hon flutti til Danmarkar. Hon fortelur, hvussu fyrrverandi maður hennara plágaði og stalkaði hana út um øll mørk, meðan hon búði í Føroyum. Hon søkti sær hjálp og ráðgeving frá myndugleikum, men har var ikki nógv hjálp at heinta. Hon kendi alla tíðina, at øll gliðu undan og vístu til onkran annan myndugleika, hon kundi venda sær til. Hon leggur áherðslu á, at tá hon sipar til *Konseptið Føroyar*, so meinar hon við landið Føroyar, soleiðis sum tað er uppbygt.

Aðrar lívssøgur vísa, at tað eru eisini tær konur, sum eru fluttar úr Føroyum á sera ungum árum, onkur sum tannáringur, tí viðurskiftini í familjuni vóru so trupul, at tær ikki orkaðu at vera í støðuni – harðskapur, kynslig misnýtsla, rúsdrekkamisnýtsla og sjálvmorðsroyndir. Sum heild hava hesar konur klárað seg væl í Danmark.

Í smáum samfeløgum, sum eitt nú í Føroyum, har sosialur status og umdømi hava stóran týdning, eru oftani nógv tabu og økir í sosiala lívinum, sum fólk hava lyndi til at skýggja. Orð verða ikki sett á veruligu trupulleikarnar. Hetta síggja vit aftur í lívssøgum hjá konum, ið eru fluttar til Danmarkar undan truplum korum í familjuni. Lívssøgurnar, og kanningin sum heild, benda á, at í Føroyum hevur almenna skipanin trupult við at handfara og gera nakað við tær „myrku" og „avskeplaðu" síðurnar av sosiala lívinum millum menniskju.

## „Eg føldi tað virkuliga forkert"

*Altso, eg føldi tað akkurát sum ikki straffað [...], men eg føldi tað, at tað var virkuliga forkert, at man varð noyddur at hiva teltpelarnar upp, og taka børnini frá teimum vandu umgevilsunum og øllum. Tí at tað er har, man er uppvaksin og føddur og [hevur] bygt sær hús og alt. Men økonomiskt fingu vit tað ikki at hanga saman.*

Henda konan varð noydd at flyta úr Føroyum við sínari familju undir búskaparkreppuni í 1990-árunum, og hevur búð í Danmark síðani. Tey høvdu eitt gott gerandislív í Føroyum, men so kom kreppan, og hon rakti tey sera meint sum familju. Hon greiðir frá, hvussu føroyska samfelagið ikki megnaði at hjálpa teimum sum familju, og hvussu svárt tað kendist at verða noydd at rýma. Í Danmark funnu hon og maðurin skjótt starv og skaptu eitt nýtt lív har. Í dag er býurin, har hon býr í Danmark, hennara heim, og hon ætlar ikki aftur til Føroya. Tó vitjar hon familjuna í Føroyum javnan.

Hyggja vit aftur í tíðina, so hava nógvar føroyskar konur leitað sær til Danmark fyri at vinna til lívsins uppihald. Búskaparkreppur – eitt nú í 1950-árunum




Kelda: *Danmarks Statistik*

og 1990-árunum – eru serstakar orsakir til, at føroyskar konur „flýggja" til Danmarkar, tí tær ikki megna at breyðføða seg sjálvar og síni í Føroyum. Aftan á seinna heimsbardaga vóru tað eisini nógvar konur, ið fóru til Danmarkar at arbeiða. Ein av teimum greiðir frá:

*Eg var 19 ár og eg kom inn [...] eitt seint kvøld. Fríggjakvøld. Tað var við einum skipi, sjálvfylgiligt, inn til Keypmannahavns havn. Og mánamorgun skuldi eg starta á eini seymistovu. Og tað gjørdi eg. Tað var einki sum æt at pípa [...] Manf yvirtók sítt lív tíðliga tá [...] Tað var jú tað, at tá tey fingu 10, 11 børn, so bleiv man sku' skjótt vaksin.*

## „Eg vil flúgva á egnum veingjum"

*Eg skal heim. Og tað havi eg altíð vitað. Frá tá eg flutti niður, so visti eg, [...] einaferðirnar so fert tú heimaftur [...] Eg havi altíð elskað Føroyar. Eg havi ongantíðirnar verið bangin fyri at fara út, men eg havi altíð vitað, at Føroyar er mítt heim, og har skulu børnini hjá mær veksa upp [...] Eg havi hildið tað vera ræðuliga vigtugt, at eg royndi mínar egnu veingir.*

Soleiðis orðar ein av teimum nógvu seg, sum fara til Danmarkar at nema sær útbúgving. Hon vildi fegin út at uppliva heimin og fáa sum mest burturúr, men Føroyar eru hennara heim. Henda konan leggur tó eisini dent á, at hon ikki er blind fyri, at í Danmark hevur hon vant seg við eitt pulserandi býarlív. Hetta kann verða ein avbjóðing, um hon flytur aftur til Føroya. Men, leggur hon afturat, tá samanum kemur, er tað hvørjum tú ert saman við, ið hevur størstan týdning.

Summar av konunum, sum eru farnar til Danmarkar at nema sær útbúgving, møta trupulleikum við at finna starv innan sítt fak, um tær flyta aftur til Føroya. Aðrar finna starv á sínum fakøki í Føroyum. Tað eru eisini tær konur, sum er komnar heimaftur til Føroya, tí tær ikki hava trivist í Danmark og ikki megnaðu at fullføra útbúgvingina, tær fóru undir. Onkrar kenna hetta sum ein ósigur. Tað eru eisini tær, sum koma aftur til Føroya, uttan at hava fullført lestur í Danmark, og velja at taka við einum av teimum útbúgvingarmøguleikunum, sum eru í Føroyum.

## At klára seg sjálva

Eitt merkisvert felags eyðkenni fyri konurnar er ein sera sterkur vilji og stórt ynski um *at klára seg sjálvar*. Ein vilji og eitt ynski, ið taka skap alt eftir, hvørja sosiala bakgrund konurnar hava. Ein ung kona orðar tað soleiðis:

*Men tað er meira hetta her at liva undir reyvini á mammu síni [...] Alla tíð hefta seg upp í onkran annan. Alla tíðina spyrja. Sjálvandi spyr man um ráð, tá man býr niðri, [...] men tað er eingin, sum blandaði seg [...] Eg haldi, at tað er nemmari at skapa sína egnu, hvat skal eg siga, sínar egnu vanar og sína egnu familju. Ella vit verða meira tvungin til at taka, hvat skal eg siga, vaksnar avgerðir.*




Kelda: *Hagstova Føroya*




Kelda: *Hagstova Føroya*

Ein onnur sigur frá, hvussu mamma hennara eggjaði henni at fáa sær eina útbúgving:

*Tú skal lesa, so at tú klárar at forsyrgja tær sjálvum, og tú mást hava eina akademiska útbúgving.*

Ein triðja greiðir frá, hvussu familjan møtti henni, tá hon á sera ungum árum gjørdist við barn:

*Altso, tá eg bleiv uppá vegin, tá vóru boðini frá mammu og teimum, tey vóru klár og greið, at „Tú forsetir í skúlanum, og tú skalt hava títt prógv og ferdugt.*

Mamman og vermamman hjálptu hesari konuni at taka sær av barninum, meðan hon gjørdi skúlan lidnan. Eitt tekin um, at henda drívmegin eisini virkar millum kvinnur í familjuni.

Kanningin vísir, at Danmark er tað natúrliga staðið, ið føroyskar konur flyta til, um tær ynskja at broyta ella betra um síni lívskor fyri *at klára seg sjálvar – teirra fremsta ynski*. Tó hevur sosiala bakgrundin hjá teimum stóra ávirkan á, hvussu henda drívmegin tekur seg út í praksis.

## Konseptið Føroyar

Konseptið Føroyar er ein øðrvísi máti at seta orð á støðuna hjá føroyskum konum og tær avbjóðingarnar, tær møta í gerandisdegnum, sum tann eina konan vísir til.

Lívsleiðirnar og flytingarmynstrið hjá konunum er ein avbjóðing til vanligu fatanina av samfelagnum sum eitt ílat. Føroysku konurnar í kanningini *klára seg sjálvar* við at skapa eitt føroyskt samfelag, ið ikki er avmarkað til geografisku Føroyar; ein siðvenja, ið fer nógv áratíggju aftur í tíðina. Danmark og Føroyar virka sum eitt felags sosialt øki fyri konurnar. Tær praktisera konseptið Føroyar.

Føroyska tjóðskaparliga sjálvsmyndin er í stórari andsøgn til flytingarmynstrið hjá konum. Hetta síggja vit aftur í mytuni um Nólsoyar Páll; mansliga hetjan, ið bardist ímóti danska yvirvaldinum. Tann framskygdi maðurin, sum sær møguleikar og framburð á sjónum. Fyri konurnar í kanningini hevur Danmark verið loysnin og ikki trupulleikin.

## Um kanningina

Kanningin er ein ph.d.-ritgerð
Kanningin fevnir um 27 lívssøgusamrøður við føroyskar konur í aldrinum 20-90 ár
Samrøðurnar fóru fram í 2013 & 2014
Helmingurin av konunum búði í Danmark og hin í Føroyum
Kanningin fevnir eisini um gjøgnumgongd av føroyskum bløðum í tíðarskeiðunum 1965-1969 & 1992-1996
Bløðini vóru Dimmalætting, 14. september, Sosialurin og Kvinnutíðindi.




## Fýra ymiskir bólkar av konum

**1. Tær verjandi**
Hesar konur er vaksnar upp í heimum, har foreldrini hava góða útbúgving og sosiala umhvørvið er gott. Hesin bólkurin av konum varðveitir somu fíggjarligu og sosialu støðu, sum tær eru vaksnar upp í.

**2. Tær bremsandi**
Hesar konur velja at 'traðka á bremsuna' fyri at broyta eina óhepna gongd í lívinum. Oftani koma hesar konur frá dysfunktionellum familjum. Tær fara til Danmarkar at útbúgva seg og klára seg vanliga væl.

**3. Tær rýmandi**
Hesar konur eru í einari støðu, har tær ikki megna at vinna til lívsins uppihald í Føroyum. Tær flýggja til Danmarkar fyri at breyðføða seg sjálvar og síni familju. Eisini í dag fara konur til Danmarkar av hesum ávum. Tær kenna seg óynsktar í Føroyum.

**4. Tær strevandi**
Hesar konur hava havt ymiskar umstøður í uppvøkstrinum, men felags eyðkenni eru, at foreldur ikki hava langar útbúgvingar. Nógvar hava flutt aftur og fram millum Føroyar og Danmark fyri at vinna á mótgangi og trupulleikum í lívinum. Tær strevast fyri at broyta ella betra um sína fíggjarligu og sosialu støðu.

## Metodisk nationalisma

Metodisk nationalisma er ein áskoðan og eitt háttalag í samfelagsvísindum, ið tekur støði í, at tjóðin er ein 'natúrlig' analysueind – eitt ílat við sosialum prosessum.
Henda tilgongd er kritiserað av nógvum vísindafólkum, eitt nú tí at áskoðanin gevur eina skeiva mynd av veruleikanum. Samfeløg eru – serliga í dag - knýtt saman tvørtur um landamørk og ofta tætt bundin og flættað inn í hvørt annað.

## Bifokalitetur

Bifokalitetur er eitt fyribrigdi, sum serliga eyðkennir fólk, ið flyta millum lond (migrantar). Hesi fólk hava evnini at skifta ímillum, ímynda sær og virka í tveimum ymiskum mentanarligum og sosialum umhvørvum. Upprunaland og tilflytaraland verða støðugt samanborin og kennast sum eitt felags øki at virka í og stuðla undir hvørt annað.

## Keldur:

Knudsen, Karin Jóhanna Leitisstein, 2016. *Fending for yourself: Women's migration between the Faroe Islands and Denmark;* a thesis for the degree of PhD. Roskilde: Roskilde University.

Javnstøðupolitikkur – tí tað loysir seg. Almannaráðið. www.amr.fo

Danmarks Statistik, www.dst.dk

Hagstova Føroya, www.hagstova.fo

# LIPPUKASSA-MENTAN OG SJÁLVDRÁTTUR

Í føroyskum útróðri varð veiðan frá gamlari tíð býtt millum bátsmenninar. Tað var ókent, at hvør maður sat í sjálvdrátti ella átti tað, sum hann sjálvur fiskaði. Men nakað eftir at føroyingar fóru at fiska við snøri frá sluppum undir Føroyum og Íslandi, kom skipanin við sjálvdrátti. Helst hevur sjálvdrátturin verið ymiskt skipaður fyrstu tíðina, men sum frá leið gjørdist talan um eina skipan, har maður fekk sína hýru fyri teir toskar, sum hann fekk. Lutfalsliga virðið á hvørjum toski varð roknað eftir triðinginum av søluvirðinum. Hinar tveir triðingarnar fekk reiðarin. Eftirlitið var lipputeljingin eina ferð um vikuna

Í greinini hugleiðir Jóan Pauli Joensen, professari, um upprunan til lippukassamentanina, sum ikki kann sigast at hava verið serliga samhaldsføst. Hann samanber skipanina við aðrar hýrusáttmálar um okkara leiðir. Bæði hetlendingar, íslendingar og fransmenn høvdu ymisk sløg av sjálvdrátti, men kanska var føroyski sjálvdrátturin tann minst samhaldsfasti.



**Jóan Pauli Joensen**
JoPaJo@setur.fo
Fólkalívsfrøðingur

Um somu tíð sum føroyingar royndu eftir stórum toski við ongli og steini á havleiðunum kring Føroyar, komu nógv fremmand fiskiskip á somu leiðir; eingilsk, skotsk, hollendsk og frá øðrum londum við. Longu í 12. øld royndu baskarar við skipum sínum á fjarleiðum í Norðurhøvum.



*Tær fyrstu føroysku sluppirnar fiskaðu við bátum á Eysturlandinum í Íslandi. Í fleiri førum var hesin fiskiskapur við línu og hesi árini vita vit einki um sjálvdrátt. Myndin er av føroyingum í Íslandi. Mynd: Tjóðsavnið.*

Teir flaktu og saltaðu fiskin umborð til víðari virking heima. Aðrar tjóðir tóku eftir baskarunum, og úrslitið kom mestsum at verða ein felags fiskivinnumentan, sum tók støði í sama produkti, nevniliga saltfiski, ið varð virkaður til klippfisk, tá hann kom til lands – til bacalao ella haberdines, sum klippfiskur eisini varð nevndur.

Fyriskriftirnar um, hvussu fiskur skuldi avhøvdast, flekjast og saltast, vóru nærum tær somu allastaðni. Sjálvt í Nýfundlandi varð lagt eina við at skera tann partin av rygginum, sum var eftir í fiskinum, so mikið skrátt, at hann líktist einum liggjandi 8-tali.

Eisini tá tað kom til tað búskaparliga, var nógv sum líktist í hesum klippfiskaframleiðandi samfeløgum. Eitt nú høvdu tey flestu truck-skipan við kontrabókum, júst sum fyrr í Føroyum, har lønin ella avrokningin at kalla øll varð útgoldin í vørum.

Saltfiskur og klippfiskur fekk stóran týdning sum

matur, bæði í Evropa og Amerika. Tað var eisini tí at danski vinnulívsmaðurin Niels Ryberg í 1772 vildi sleppa upp í part og fór at gera royndir við skipsfiskiskapi undir Føroyum. Hann vildi læra føroyingar at standa á skipsdekki og fiska, men tær royndirnar miseydnaðust fullkomiliga, tí teir ráðandi í Føroyum tá vildu ikki taka við nøkrum nýggjum. Onkur lærdi kortini at virka eitt sindur av klippfiski. Tað skuldu ganga 100 ár, til føroyingar fóru undir skipsfiskiskap av álvara.



**Mynd 1:** *Sjálvdráttur í tí týdningi, sum vit komu at kenna hann við snørisfiskiskapi á sluppunum, var púra ókendur á útróðrarbátum í Føroyum. Mynd: Born, 1793.*

## Sjálvdráttarfiskur og samveiða

Føroyingar hava altíð fiskað, og fiskur hevur verið ein týðandi táttur í matarhaldinum. Nakað av turrum fiski varð eisini útflutt. Tað var tann stóri toskurin, sum varð ráskorin, ið gav eitt sindur av peningi. Ynskið um stóran tosk var ein av orsøkunum til, at teir brúktu so stóran ongul á útróðri. Agnið, teir brúktu, var fiskabeita. Teir vildu ikki brúka annað, sjálvt um teir vistu, at eitt nú skotar brúktu sild til agn. Tað dámdi føroyingum ikki, tí teir hildu, at sildaagnið gjørdi toskarnar til óvenjingar, so at teimum ikki dámdu fiskabeituna, og tí sendu teir klagur um skotar, ið brúktu sild.

Tað gamla var, at á útróðri fekk báturin ein part og hvør av bátsmanningini ein part, tó so at bátsformaðurin og andøvsmaðurin fingu eitt lítið sindur umframt, ofta bara tann størsta og næststørsta toskin. Siðvenjan var eitt sindur ymisk frá bygd til bygd, hvør av teimum fekk tann størsta, og hvør fekk tann næststørsta toskin. Fingu teir kalva, var hann tikin sundur og býttur javnt millum bátsmanningina. Kortini komu ikki allir fiskar upp í býtið. Eitt nú vóru longa, brosma og onkur annar fiskur tað, sum teir nevndu *sjálvdráttarfiskar*, sum hvør einstakur átti sjálvur. Vanligt var eisini at ein, sum ikki rættiliga var komin til mans, og sum kanska var við sum 9. maður á áttamannafari, ikki kom upp í býtið, men átti bara tað, sum hann sjálvur fiskaði.

Yvirhøvur varð veiðan býtt millum bátsmanningina á tí einstaka bátinum, men í ávísum bygdum í Norðuroyggjum høvdu tey *samveiðu*. Tá kastaðu bátarnir, sum høvdu verið á útróðri tann dagin, alla veiðuna saman og býttu hana millum sín.

## Sosial atlit og piltahúkur

Tað vanliga var, at ein partur fór til bátin, men tað hendi seg, at báturin bara fekk hálvan part. Onkrastaðni var tað so, at báturin ongan part fekk, men so var manningin felags um at lata tað, sum bátinum tørvaði fyri at verða hildin.

Húskallarnir hjá bónda fingu leingi ikki part. Teirra lutur fall til bóndan, sum teir tæntu hjá. Hetta broyttist so við og við, sum vinnuligi fiskiskapurin vant upp á seg. Útróður og húskallaarbeiði kom tá at vera leyst hvørt av øðrum. Tá fingu húskallarnir fullan part eins og restin av bátsmanningini.

Ávís sosial atlit vórðu eisini tikin, so at tey, sum leitaðu sær oman á støðna, fingu fisk heim við. Hesi kundu vera fátæk fólk ella uppilagstir menn, sum høvdu munnar at metta. Tá línan kom, var tað ikki óvanligt, at piltur slapp at eiga ein serligan húk á línuni, og kom fiskur á hann, átti pilturin tann fiskin. Smádreingirnir vóru sjálvandi spentir, um fiskur var komin á teirra húk, og tað stimbraði teirra veiðihug.

Fara vit eitt sindur longur fram í tíðina, so broyttist býtið nakað við motorbátunum og installeringunum, tí tá vórðu útreiðslurnar til bátin fleiri, og luturin hjá bátinum gjørdist tilsvarandi størri. Tá teir fiskaðu við línu, var tað eisini vanligt, at línan í sjálvum sær fekk ein part.

## Sjálvdráttur á báti var ókendur

Tað, sum hevur týdning í hesum sambandi, er, at *sjálvdráttur* í tí týdningi, sum vit komu at kenna hann við snørisfiskiskapi á sluppunum, var púra ókendur í Føroyum, eisini í sambandi við útróður í



**Mynd 2:** *Tað tykist, sum at sjálvdrátturin á føroyskum sluppum byrjaði nakað eftir at føroysku sluppirnar fyrst í 1890-unum fóru út á bankarnar at fiska. Mynd: Tjóðsavnið.*



**Mynd 3:** *Menn standa við vaðbeini á føroyskari slupp. Mynd: Tjóðsavnið.*

nýggjari tíð. Við lippukassamentanini á sluppunum fekk hugtakið *sjálvdráttur* eitt nýtt innihald, sum ikki hevði verið kent fyrr. Sjálvdrátturin hevði sín uppruna uttan fyri Føroyar og kann knýtast at fiskiveiðimentanini í Norðurhøvum.

Tey flestu kenna til søguna um ta ferðina, nakrir føroyingar við amtmanninum Chr. Pløyen á odda vóru á eini kunningarferð í Hetlandi í 1839. Har kunnaðu teir seg um hetlendska fiskivinnu.

Tað gjørdi, at myndugleikarnir í Føroyum fingu hug at menna føroysku fiskivinnuna, og stutt eftir fingu teir eisini ein íslending at koma til Føroya at læra føroyingar at salta fisk og virka hann til klippfisk. Einahandilin fór somuleiðis at taka ímóti heimavirkaðum klippfiski og seinni eisini útróðrarfiski, men gongd kom ikki rættiliga á fyrr enn við fríhandlinum.



**Mynd 4:** *Fiskimaðurin skar sjálvur lippurnar úr toskinum og koyrdi tær í lippukassan. Tá vikan var liðug, vórðu lippurnar taldar og skiparin skrivaði niður, hvussu nógv hvør hevði fiskað ta vikuna. Mynd: Tjóðsavnið.*

## Hetlendingar fiskaðu við Føroyar

Eitt var, at føroyingar fóru til Hetlands í 1839, men skjótt komu hetlendingar eisini til Føroyar. Veruleikin er, at hetlendingar komu nógv fyrr enn føroyingar upp í ta klippfiskamentan, sum eyðkendi fleiri samfeløg í Norðurhøvum. Menningin í Hetlandi byrjaði við útróðri við árabáti. Har vóru tað „landlordarnir", sum sótu við valdinum og sum eisini høvdu ræði á útróðrinum og á fiskavirkingini. Teir vunnu so mikið av peningi, at teir fóru at gera íløgur í fiskiskip, sum fóru víða um, men frá umleið 1850 komu fiskileiðirnar kring Føroyar at fáa størstan týdning hjá teimum.

Hetlendingar komu nógv inn á firðirnar í Føroyum og komu í samband við føroyingar, tí teir skiltu hvønn annan og fingu nyttu burtur úr hvørjum øðrum. Eitt nú lærdu teir føroyingar at fiska gággur við gággulínu, so teir kundu selja hetlendingum gággur til agn.

Føroyingar vóru, sum nevnt, við fríhandlinum farnir at salta fisk og virka hann til klippfisk, men teir fingu ikki nóg mikið av fiski. Tað kom tí væl við hjá eitt nú T. F. Thomsen á Tvøroyri, at hann kundi keypa saltfisk frá hetlendingum og virka hann til klippfisk. At teir so keyptu tubbak og brennivín fyri henda fisk, sum teir smuglaðu til Hetlands, er ein onnur søga.

## Føroyingar fiskaðu við hetlendingum

Føroyingar fingu sær kjans við hetlendingunum, eitt nú fóru húskallarnir javnan av gørðunum um sumrarnar fyri at sigla við hetlendskum skipum, og fleiri vistaðust eisini í longri og styttri tíðarskeið í Hetlandi. Sambandið var so gott, at ein tann seinasta hetlendska sluppin hevði bæði føroyskan skipara og føroyska manning. Tað hendi seg eisini, at hetlendingar vóru skiparar á føroyskum sluppum. Hetta samband gjørdi sjálvandi, at føroyingar lærdu nógv av hetlendingum.

Nú nærkast vit tí, sum er endamálið við hesi greinini, nevniliga at koma inn á, hvussu tað bar til,



**Mynd 5:** *Í sjálvdrátti stóð og fall inntøkan hjá fiskimanninum við, hvussu nógvan fisk hann dró. Tað hendi seg, at onkrir menn fingu tvífalt so nógva hýra, sum aðrir. Mynd: Tjóðsavnið.*

at føroyingar fingu ein so radikalan form fyri sjálvdrátt á sluppunum, sum teir fingu. Hetlendingar høvdu ein ávísan sjálvdrátt, og ein spurningur er, um føroyingar kanska høvdu misskilt sjálvdráttarskipanina hjá hetlendingum og lótu hana verða galdandi fyri alla manningaúrtøkuna á føroysku sluppunum.

Veiðiamboð sum lína, garn, nót og trol hava tað íborið, at tað er torført at vísa á lutin hjá tí einstaka, og tað kemur tí eisini at ávirka býtið, so allir fiskimenn fáa sama part, um tað ikki eru onnur viðurskifti ella serlig ábyrgd, sum kann hátta tað øðrvísi.

Hetta hevur snørisfiskiskapur ikki í sær, tí er tað púra greitt, at talan er um eitt individuelt amboð, sum tann einstaki hevur ræði á, og við hesum amboði ber til at vaksa um úrtøkuna við at fáa fiskimenn at kappast hvør móti øðrum, soleiðis at teir, sum fiska mest, fáa meira í úrtøku enn teir, sum fiska minni. Og samstundis fær reiðarin eisini meira burturúr.

## Íslendingar og fransmenn høvdu sjálvdrátt

Sum nevnt var fiskiskapurin í Norðurhøvum mestsum ein felags fiskivinnumentan, men tíverri hevur tað ikki verið møguligt at kanna eftir, hvussu býtið hevur verið umborð hjá teimum ymisku tjóðunum, sum hava fiskað við snøri á hesum leiðum.

Onkrar ábendingar eru kortini, og eg havi fingið at vita, at í Íslandi høvdu teir eina skipan, sum líktist teirri føroysku, men ofta við ymiskum staðbundnum frábrigdum. Eisini vita vit, at á fronskum fiskiskipum, sum fiskaðu við snøri, skóru teir lippur, sum teir goymdu í lippuskjáttu.

Eins og í Føroyum vórðu lippurnar javnan taldar upp, og talið av lippum hjá tí einstaka varð skrivað upp í bók hjá skiparanum. Sagt er, at franskir fiskimenn ikki kappaðust um at fáa stóran fisk, men um at fáa eitt stórt tal av fiski. At fiska einar 3.000-4.000 fiskar var roknað sum gott, men tað vóru teir, sum fingu tað dupulta ella meira enn 6.000 fiskar.

Tíverri sæst ikki av heimildunum, um úrtøkan



**Mynd 6:** *Sjálvdráttarskipanin hekk uppi í sluppunum næstan til hesin fiskiskapur helt uppat í 1958, tá fiskiskipaflotin varð endurnýggjaður. Mynd: Tjóðsavnið.*

Mynd 7: *Avrokning frá langbummaranum Grace í 1886. Her sæst, at allir fiskimenninir fingu somu avrokning ella fasta løn av manningarpartinum. Mynd: Úr savninum hjá T. F. Thomsen.*



| | | | |
|---|---|---|---|
| | | 27 | |
| Brød | | 3 | 20. |
| 8595 ℔ stor Tollfisk | 6ø | " | " |
| 1227 ℔ smaa d° | 5ø | " | " |
| 536 ℔ Hiser. | 4½ø | " | " |
| 9920 ℔ stor Tollfisk | 6ø | | |
| 5014 ℔ smaa d° | 5ø | | |
| 3662 ℔ Hiser. | 4ø | | |
| 622 ℔ Soi | 3ø | | |
| 40 ℔ Langer. | 6ø | | |
| Olavus Djurhuus. | | 78 | 30. |
| Olavus Poulsen. | | 78 | 30 |
| Daniel J. Poulsen. | | 78 | 30 |
| Marius Olsen. | | 78 | 30 |
| Jacob F Joensen | | 78 | 30 |
| Zacharias Danielsen | | 78 | 30 |
| Johan M Djurhuus | | 78 | 30 |
| Daniel J. Petersen | | 78 | 30 |
| Morten Leith | | 291 | " |
| Sigurd Lenz. | | 291. | " |
| Brød | | 4 | 32 |
| Koster | | 4. | " |
| Gagn. | | 3 | 75 |
| | | 1 | 44 |

bert varð roknað út frá tí tali, sum hvør einstakur fiskaði, ella um tað eisini var annað býti, sum tað var í eitt nú Hetlandi. Í Hetlandi fekk manningin helvtina av veiðuúrtøkuni og skipið hina helvtina, men nakað fór eisini av óbýttum. Við føroysku sluppunum fekk manningin ⅓ og reiðarin ⅔. Tað var innan fyri nevnda triðing av veiðivirðinum, at føroyski sjálvdrátturin var galdandi. Skiparin fekk tó fastan part, sum í 1880-unum var 10 prosent av bruttosøluvirðinum.

## Hetlendski sjálvdrátturin øðrvísi

Tað áhugaverda við avrokningini hjá hetlendingum er, at av óbýttum fór tað, sum hetlendingar nevna *score money*. *Score* er eitt nøgdarheiti, ið svarar til 20. Fyri hvørja *score*, fingu hetlendsku fiskimenninir nakað eyka – ein bonus. Fyri at halda skil á tí, skóru teir lippur, júst sum teir gjørdu í Føroyum.

Hesar *score money* fingu teir fyri at spenna seg út og fiska so nógv sum gjørligt. Hetta bonus var tó bert ein partur av úrtøkuni, sum lá millum 9 og 17 prosent eyka hjá tí einstaka fiskimanninum. Tann helvtin av veiðuúrtøkuni, sum teir áttu sjálvir, varð býtt javnt millum manningina. Sjálvdráttarparturin var nógv tann minsti parturin. Úrtøkan við hetlendskum sluppum varð sostatt býtt eftir munandi samhaldsfastari reglum enn umborð á føroysku sluppunum.

## Føroyski sáttmálin um sjálvdrátt

Føroyskir útgerðarmenn stovnaðu Reiðarafelagið í 1909, men fiskimenn fingu ikki sítt fiskimannafelag fyrr enn í 1912. Áðrenn tað vóru tað reiðararnir, sum samráddust við tey einstøku skipini. Sum dømi kunnu vit taka sáttmálan millum *Jens Mohr* og manningina á *Lalla Rookh* frá 16. mars 1894. Í hesum sáttmála stendur, at tá veitt varð við línu, vórðu partarnir býttir javnt, men tá fiskað varð við snøri, varð úrtøkan hjá tí einstaka fiskimanninum roknað út eftir, hvussu nógv hann hevði fiskað. Fýra smáfiskar taldu fyri ein stóran fisk, og einki fekst fyri undirmálarar. Eftir at Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið høvdu undirskrivað sáttmála í 1911/12, varð sami sáttmáli at galda fyri øll skip.

Í sáttmála frá 1919 stendur, at skipið fekk ⅔ av úrtøkuni og manningin ⅓, og at „*Besætningens Andel ved Haandlinefiskeri deles i Forhold til det Antal Torsk, Langer, Brosmer, Kuller og sej paa mindst 12" Længde, som hver har fanget, idet en „stor" Fisk regnes mod 4 „smaa". Som stor fisk regnes kun Torsk og Langer paa mindst 18" Længde. Paa samme Maade deles Udbyttet af Lever og Rogn.*"

Onkrar broytingar komu í seinni, men tað broytti ikki sjálvt sjálvdráttarprinsippið. Fyri at halda skil á, hvussu nógv hvør fiskaði, skóru teir *lippuna* úr teimum stóru fiskunum og *gilluna* ella foragnið úr teimum smáu. Alt varð goymt í lippukassanum og talt upp eina ferð um vikuna. Fyri føroyskar slupp-fiskimenn kom lippukassin sostatt at verða ein tann mest týðandi lutur í lívi teirra, tí hann umboðaði so nógv, bæði upp á gott og ilt.

## Var føroyska skipanin misskilt?

Spurningurin er so, hví føroyingar valdu at hava eina so radikala skipan, sum teir fingu umborð á sluppunum. Taka vit hetlendingar, var hjá teimum, sum nevnt omanfyri, bert talan um eyka bonus, ið fór av óbýttum. Tann stóri parturin av úrtøkuni var tann, sum teir áttu í síni helvt av veiðuni, og hesin parturin varð býttur javnt millum manningina.

Tað var heldur ikki meira enn rímiligt, tí arbeiðið umborð á eini slupp var annað enn at fiska. Tað var eisini at rigga til, ganga vakt, gera reint, salta fiskin o.s.fr. Í Føroyum vóru eingi atlit tikin til hetta. Úrtøkan hjá tí einstaka fiskimanninum kom bert burtur úr tí, sum hvør einstakur fiskaði. Tað hendi seg, at onkur maður fiskaði meira enn dupult so nógv sum ein annar, og tað vóru ikki altíð teir raskastu sjómenninir, sum fiskaðu mest, tí fiskieydnan hekk ikki altíð uppií hjá teimum.

Raskir sjómenn uttan stórvegis fiskieydnu kundu

sostatt fáa helvtina minni enn menn við góðari fiskieydnu. Og lippukassamentanin førdi ikki bert til stóra kapping millum manningina, men eisini til kapping millum skiparar, sum vildu hava menn við sær, ið høvdu góða fiskieydnu. Úrslitið var m.a. ein øgilig pátrúgv á sluppunum, ið hevði til endamáls at fremja fiskieydnuna hjá tí einstaka.

Lippukassamentanin førdi eisini til eina fatan av fatalismu ella lagnutrúgv millum fiskimenn, sum gjørdi teir ikki sørt ráðaleysar um viðurskifti síni, sum ofta vóru ring at broyta, tí tað var fiskurin, sum gjørdi av, hvønn húk hann tók.

Spurningurin er, hví føroyingar góðtóku hesa alt annað enn samhaldsføstu og radikalu sjálvdráttarskipan í so langa tíð? Fiskimenn kundu sjálvir fáa tað broytt við samráðingum, men tað er einki, sum bendir á, at teir hava gjørt tað. Tað tykist, sum at teir hava fatað skipanina sum ein veruleika, ið teir einki kundu gera við. Tað var bert, tá so nógvur fiskur var at fáa, eitt nú í Grønlandi, at tað ikki vóru stundir at skera lippur, at hetta kundi broytast viðhvørt.

Kanska er tað so, at føroyingar upprunaliga hava misskilt hetlendsku skipanina við *score money* og umsett hana til eina nógv radikalari skipan, sum ongantíð fyrr hevði verið til í Føroyum, men sum kom at skapa eina fatalistiska lagnutrúgv millum føroyskar skipsfiskimenn. Skipanin broyttist ikki, fyrr enn fiskimenninir fingu onnur fiskiamboð, ið ikki høvdu sama individuella demoniska kappingaranda íbornan, sum fiskilodd og snøri.

Sjálvdráttarskipanin hekk uppi í sluppunum, næstan til hesin fiskiskapur helt uppat í 1958, tá fiskiskipaflotin varð endurnýggjaður. Við sluppunum fór sostatt eisini ein skipan í søguna, sum neyvan allir fiskimenn hava so nógv gott at minnast aftur á, tí hon gjørdi ikki øllum væl, tann dagin uppgerðin fyri túrin kom.



**Mynd 8:** *Avrokning frá Grace í 1888. Her sæst, at hýran hjá fiskimonnunum er ymisk. Tann besti tjenti 104,34 krónur, men ein fiskaði fyri bara 53,96 krónur. Mynd: Úr savninum hjá T. F. Thomsen.*

**Brot úr sáttmála millum reiðaran Jens Mohr og manningina á Lalla Rookh dagfestur 16. mars 1894.**

Manningin fekk frían kost umborð og útgerðarmaðurin læt fiskiamboð og salt og annað. Av sjálvari veiðuni var luturin hjá útgerðarmanninum ⅔ og luturin hjá manningini ⅓:

*"Af Mandskabets ⅓ del tilkommer der Kaptainen 2 Parter. Bedstemanden 1 ½ Part. Kokken 1 part og hver ad det øvrige Mandskab 1 Part og bliver ved Fællesfiskeri (Langlinefiskeri) Parterne at beregne ligeligt og i de overnævnte 2 Parter til Kaptainen, den 1 ½ Part til Bedstemanden og Kokkens ene Part og hver af de øvrige Mandskab i Forhold til det Antal Mand, der have deltet i Fiskeriet. Ved Haandlinefiskeri blive de overnævnte 2 Parter til Kapteinen, den 1 ½ Part til Bedstemannen og Kokkens ene Part først at udfinde som Middelparter og trækkes samlede fra overnævnte ⅓ Del af Fangsten. Resten deles mellem det øvrige Mandskab og Bedstemandens (1 Part) i Forhold til det Antal Fisk, enhver har trukket. Fire smaa regnes for én stor Fisk. Undermaalere regnes ikke med, lige saa lidt hvad Kaptainen maatte fiske. Rederiet overtager Kokkens Part imod at betale ham 40 Kroner om Maaneden.*

*Fiskere, som gjøre deres første Tour, tilkommer der kun ¾ Part af den Fisk, der fanges med Langline, dog kan efter Kapteinens skjøn den, der udviser Dygtighed og Flid, erholde fuld Part.*

*Den eventuelle 1/1 part, som muligvis fradrages, kan efter Skipperens Skjøn delvis eller helt tillægges mandskabet, der have faret længst med fartøjet og vist sig flinke og ordentlige, som Tillæg til deres part. Tilfalder den ikke nogen enkelt af mandskabet, tilfalder den hele Mandskabet.*

*Den mandskabet tilkommende betaning kan ikke forlanges udbetalt før 3 Maaneder efter, at den sidste Fangst er solgt."*

## Heimildir og annar lesnaður um evnið:

**John Goodlad :** The Cod Hunters, Shetland Heritage Publications, 2017.

**Jóan Pauli Joensen:** Færøske sluppfiskere, Lund 1975.

**Jóan Pauli Joensen:** Folk og fisk. Ålborg, 1985.

**Elín Pálmadóttir:** Franskí Biskví. Franskir fiskimenn við Íslandsstrendur, Reykjavík, 2009.

# EITT SVAR ER EITT SVAR ER EITT SVAR?

## TØRVURIN Á NØKTANDI ARGUMENTATIÓN Í EINUM FÓLKARÆÐI



Síðsta heyst skrivaði eg BA-ritgerð á Føroyamálsdeildini við heitinum „Retoriskar snildir og metingar av svarunum og argumentatiónini hjá einum politikara". Eg nýtti tá ymisk ástøði at meta um góðskuna av argumentatiónini hjá einum ávísum politikara. Greinin lýsir burtur úr uppgávuni, hví fullfíggjað argumentatión er týdningarmikil í einum fólkaræði, og vísir á nakrar nógv nýttar snildir í kjaki og politiskum orðaskifti




**Ingilín D. Strøm**
ingilinstroem@gmail.com
BA í føroyskum máli og bókmentum av Føroyamálsdeildini


Við kjakinum um *fake news* og *alternative facts*, ið av álvara tók dik á seg í amerikanska valstríðnum í 2016, eru í seinastuni fleiri átøk sett í verk, ið kanna sannleikan í útsagnum og uppáhaldum hjá politikarum.

Tað lættasta hevði verið, um politikarar góvust við at nýta snildir, ið geva skeikladar myndir av veruleikanum. Tíverri er einki, sum bendir á tað. Tvørturímóti hava flestu flokkar ráðgevar, ið vegleiða politikarum í snildum og marknaðarføring.

Hjá brúkarum av nýggjum og siðbundnum miðlum er neyðugt at geva sær far um, at ikki alt, sum sær út at vera vitan, svar ella argumentir, endiliga er tað.

Um ætlanin er at varðveita fólkaræði, har veljarar skulu velja umboð eftir egnari sannføring, mugu borgarar hava atgongd til væl grundaða og viðkomandi vitan.

Tí er tað umráðandi, at føroyskir miðlar í størri mun fara at fáast við sannleikaeftirkanning, og at føroyski samfelagsborgarin er kritiskur og vitandi um snildirnar.

## Argumentatiónsfólkaræði og neyðuga góða kjakið

Tá ið vit í valhølunum skulu seta okkara kross, mugu vit tí gera okkum nakrar tankar um, hvar hann skal setast. Politikkurin, ið verður førdur, er knýttur at, hvørja støðu borgarin tekur.

Tí er tað týdningarmikið, hvussu landsins politikarar brúka málið. Hetta uppáhaldið, at veljarar kunnu flyta seg og broyta meining við at luttaka í kjaki, er høvuðstankin í hugtakinum *deliberativt fólkaræði* (Koch, 1945: 4+6-7).

Fyri týska heimspekingin Jürgen Habermas hevur fullkomna deliberativa kjakið semju sum endamál. Hetta er eitt ideal, sum í sjálvum sær er trupult at røkka. Um vit ikki søkja semju, hví so kjakast?

Til hendan spurningin svarar professari í retorikki á Københavns Universitet, Christian








Kock, at borgarar og politikarar skulu brúka kjakið til at fáa neyðugu vitanina um eitt evni, ið politikarar skulu lóggeva eftir og borgarin velja eftir. Hann rópar hetta argumentatións-fólkaræði.

Kock setir ítøkilig krøv til kjakið. Tað eina kravið er, at svarast skal. Men ein og hvør framsøgn er ikki at rokna sum svar. Eitt svar skal antin siga, hví mótargumentið er skeivt ella óviðkomandi og tí vánaligt, ella skal svarið viðurkenna mótargumentið og greiða frá argumentinum fyri tí.

Felags virði skulu vera grundarlagið undir argumentatiónini sambært Kock, ikki persónlig hugsjón og egin áhugamál. (Kock, 2011: 31, 32)

## Politiskt kjak er ikki millum javnlíkar

Retorikarin Charlotte Jørgensen skilir í sama anda sum Kock millum *orðaskifti* og kjak. Í *orðaskiftinum* metir hon, at tey, ið luttaka, eru teir partar, ið opponera hvør móti øðrum.

Tað gera tey fyri at røkka endaligari semju, ið liggur so nær sannleikanum, ið til ber. Í kjakinum er endamálið ikki at semjast, men at triðipartur skal kunnast nóg mikið til at taka eina væl grundaða avgerð, meðan argumenterandi partarnir hava hvør sína meining.

Í teimum førum, har nøktandi argumentir eru úr báðum pørtum, er kjakið sostatt eitt hent upplýsandi amboð. (Jørgensen. 1995: 31)

Avgerandi fyri góðskumetingina av argumentatiónini er, um samskift verður symmetriskt ella ikki. Tað merkir, um sambandið millum áhoyrara, kjakarar og talara er sum millum javnlíkar, tá vit hugsa um vitan, vald, tign o.tíl. Er støðan *ósymmetrisk*, hevur talarin ella kjakarin størri ábyrgd at ansa eftir argumentatiónini.

Tá talan er um eitt politiskt kjak, er støðan sostatt asymmetrisk: politikarar øðrumegin og veljarar hinumegin. Tí eiga krøvini til argumentatiónina at vera høg (Jørgensen og Onsberg, 2015:110).

## Snildir óskikkir í kjakinum

Sambært Kock kunnu vit saktans hava ymsar meiningar og kjakast fyri at vinna frama fyri okkara meiningum. Trupulleikin er, tá hetta verður gjørt, uttan at fólk vita tað.

Hetta er ein av óskikkunum í tí politiska kjakinum, sum Kock nevnir *øvutan lummastuldur*, ið verður framt fyri at sleppa undan at greiða frá og grundgeva fyri ætlanum og sjónarmiðum við at sníkja sjónarmið niður í *lummarnar* á fólki, uttan at tey varnast tað (Kock, 2011:44).

Ymiskir mátar eru at fremja øvutan lummastuldur. Ein teirra nevnist *framing* ella *innramman*. Rammur hava við sær, at tosað verður eins og eitt ávíst sjónarmið er absolutt og givið frammanundan.

Ein innramming er við øðrum orðum ein ógvuslig generalisering av einum evni ella sjónarmiði, sum fyriskrivar ein ávísan hugburð.

Tá fólk ótilvitað brúka innrammingina, geva tey sær kanska ikki far um, hvørji sjónarmið tey óbeinleiðis flyta fram. „*Skattalætti*" er eitt dømi um innramming. Hon sigur óbeinleiðis, at skattur er nakað tungt og neiligt, ein byrða. Orðið kundi alternativt verið *vælferðarminking*.

Tað sama ger seg galdandi við setninginum „*tað skal loysa seg at arbeiða*", ið ofta knýtir seg at tosi um skattalætta. Hesa orðingina hevur serliga høgravongurin brúkt dúgliga.

Tó er eydnast at fáa fólk á vinstraveinginum at




brúka orðingina, um enn í neiligum hami. Hóast orðingin verður nýtt í kritikki av útsøgnini, verður hon borin fram, og oftari vit hoyra hana, veruligari verður hon sambært kognitiva lingvistinum George Lakoff (Lakoff, 2014).

## Eitt svar er eitt svar er eitt svar?

Ikki allar framsagnir kunnu metast sum svar. Áðurnevndi C. Kock varpar ljós á, hvussu mann við *dyljan*, *kveistran* og *avskeplan* kann svara, men ikki nøktandi.

Tá kjakarar *dylja* eitthvørt, royna tey at sleppa sær undan at svara upp á evnið, ið spurningurin viðger. Eitt nú við at tosa um okkurt annað. Oftast eru hesi svarini ræðuliga long, uttan at snúgva seg um nakað ítøkiligt yvirhøvur.

Við *kveistran* heldur kjakarin seg til spurningin, men kveistrar burtur, at spurningurin ella evnið, ið verður umrøtt, er umráðandi, men greiðir ikki frá hví. Av og á hoyra vit politikarar svara við „*Tað kann tú siga, men…*" og so tosa um okkurt annað, og soleiðis ikki viðganga fortreytina í spurninginum. Hetta er oftast dømi um kveistran.

*Avskeplan* merkir, at svarað verður, men tó á ein brongladan heldur enn beinleiðis hátt. Eitt nú kann verða spurt um eitt ítøkiligt mál, men kjakarin svarar á ideologiskum støði. Ein spurningur kann snúgva seg um, hví eitthvørt ikki er fingið í rættlag her og nú, men svarið snýr seg um, hvat er gjørt í fortíðini. Spurningurin kann snúgva seg um ein ávísan persón ella bólk av fólki, meðan svarið snýr seg um ein annan persón ella bólk av fólki.

Eitt dømi kundi verið, tá ið eitt landsstýrisfólk svarar upp á eitt kritikkpunkt við at lýsa, hvat undanfarna landsstýrisfólk hevur gjørt skeivt (Kock, 2011: 145).

Eisini tøl, ið vit oftast fata sum sannroyndir, kunnu vísa ymiskt, alt eftir hvørji tøl verða brúkt og ikki brúkt. *Talfusk* er, tá kjakarar velja at brúka ávís tøl, ið seta teirra politikk í eitt betri ljós, og soleiðis ikki lýsa allan sannleikan.

Tá føroyski veljarin ikki fær greiðu á eitt nú fiskivinnukjakinum, kann tað vera orsakað av *talfuski*. Eitt nú blandaði ávísur politikari kvotavirði og útflutningsvirði í sama pott til valið í 2015. Tað gjørdi hann fyri at stuðla sínum egna argumenti, hóast tølini í veruleikanum ikki eru sambærilig.

Í eini kjakstøðu er trupult at svara, tá tøl verða slongd yvir borðið. Tí er hetta ein tann truplasta snildin at hava við at gera (Kock, 2013: 62, 70).

## Vald krevur góða kjakmentan

At duga at tosa fyri seg kann merkja ymiskt. Um tað snýr seg um at duga væl at greiða frá sínum sjónarmiðum, vælgrundaðari og áhugaverdari argumentatión, so er tað jaligt fyri fólkaræðið.

Hinvegin kann tað eisini merkja, at ein dugir at snúgva sær í einum kjaki og útnytta sína vitan og vald fyri at fáa sítt ígjøgnum uttan reiðiliga argumentatión og/ella frágreiðing.

Vit mugu finnast at, tá ið politikarin ella almenni kjakarin kjakast fyri at vinna frama fyri egin sjónarmið, fyri at leggja vald inn undir seg uttan nøktandi argumentatión. Tí tá tekur kjakarin ikki atlit til, at borgarin skal taka støðu út frá persónligari sannføring gjøgnum gott alment kjak við fullfíggjaðum argumentum úr relevantum sjónarhornum. Fólkaræðið merkir ikki bara, at meirlutin ræður.

Ímyndin er, at fólkaræðið eigur eisini at vera kjak við argumentum fyri og ímóti, har tey, ið lurta, kunnu broyta meining, og nøkur teirra, ið ikki hava tikið støðu, taka støðu. Tey, ið luttaka og/ella hoyra kjakið, fáa meir vitan um evnið, kjakast verður um. Og nógv, ið hava tikið støðu frammanundan, halda fast í teirri støðuni, men nema sær meiri vitan og laga sína meining til onkursvegna.

Felags virði skulu vera grundarlagið undir argumentatiónini, ikki persónlig hugsjón og egin áhugamál.


**Heimildir:**

Jørgensen, Charlotte. "Debattens væsen og uvæsen: Om fjendtlighed i offentlig debat". Retorik Studier, Nr. 10, 1995. s. 3-43.

Jørgensen, C., Onsberg, M.: "Praktisk argumentation". 3. udgave. Praxis - Nyt teknisk forlag. Odense. 2015.

Koch, Hal. "Ordet eller Sværdet". Berlingske Aftenavis 12/9 1945 s. 4+6-7. Siterað úr https://danmarkshistorien.dk/leksikon-og-kilder/vis/materiale/hal-koch-ordet-eller-svaerdet-1945/. Vitjað 23/10/2018.

Kock, Christian. "De svarer ikke. Fordummende uskikke i den politiske debat". Gyldendal, Keypmannahavn. 2011.

Lakoff, George. "THE ALL NEW Don't think of an elephant": Know your valuables and set the frame." Chelsea Green Publishing. London. 2014.

# NÁMSVESPUORMVERUR Í BLØÐUNUM Á DÚNBJARKAR- OG SITKAELRISTRØUM Í FØROYUM



**Jens-Kjeld Jensen**
Sjálvlærdur
náttúrufrøðingur
Heiðursdoktari á
Fróðskaparsetri Føroya

Æðraveingir eru ein hópur av fleiri enn 200.000 lýstum sløgum; kendasta slagið í Føroyum man vera vanliga vespan, sum hevur verið her síðan 1999, og sum mong fólk hava illneitast um, hóast hesi kykt eisini gera sítt gagn í náttúruni *(les Frøði 2001 1:4)*.

Vespan hoyrir til hópin Hymenoptera, á føroyskum æðraveingir, sum hevur fýra veingir (mynd 1), meðan vanligar flugur harafturímóti einans hava tveir veingir.

Hópurin æðraveingir hevur fleiri undirhópar, har ein teirra er plantuvespur (Symphyta), sum aftur hevur undirhópar, m.a. yvirættina blaðvespur, sum er ein sera stór yvirætt við fleiri enn 8.000 sløgum.

Flestu ormverur hjá blaðvespum sita og eta av blaðnum sjálvum, og ymisku sløgini eru ofta einans at finna á einum ávísum plantuslagi, ella á nær skyldum plantum, runnum ella trøum.

Nógvir urtagarðseigarar hava seinnu árini lagt til merkis ormverur, sum eta øll bløðini á ávísum berjarunnum kring landið (m.a. stikkulsberja- og ripsrunnum). Men summar blaðvespuormverur liva "millum skins og hold" inni í sjálvum blaðnum, t.v.s. at tær minera bløðini við at eta burtur av blaðvevnaðinum, og henda greinin snýr seg um eina slíka ormveru.



**Mynd 1**: *Her síggjast teir 4 veingirnir á elrisnámsvespu*



**Mynd 4:** *Birkivevjari stóri (Mynd: Hans Eli Sivertsen)*




**Mynd 2:** *Elrisnámsvespuormvera (Mynd: Andrew Liston)*



**Mynd 7:** *Elrisnámsvespa*

*Á hvørjum ári koma nýggj vespusløg til landið. Í mongum førum eru hesi innsløðd við vørum og serliga plantum og trøum, sum verða innflutt úr øðrum londum. Ein ávís natúrlig innsløðing fer ivaleyst eisini fram, m.a. orsakað av veðurlagsbroytingum og broytingum í lívsumstøðum, sum til dømis føðigrundarlagnum. Einans nøkur fá vespusløg yvirliva og fjølgast í Føroyum.*

Í fleiri enn 350 ár hava fólk flutt inn trø og runnar til Føroya, og einaferð í 1980-árunum legði Tróndur Gilli Leivsson til merkis, at summi sitkaelristrø vóru fongd við minerandi ormverum (mynd 2). Seinni vístu ormverurnar seg eisini í trøum av dúnbjørk (mynd 3).



**Mynd 3:** *Dúnbjørk fongd við minerandi ormverum*



**Mynd 6:** *Ein gul klisturpláta hongur millum Jens-Kjeld Jensen og Eyðun Christiansen (Mynd: Marita Gulklett)*

Í 2014 setti Tróndur seg í samband við meg og greiddi frá, at hann uttan úrslit hevði roynt at kanna, hvørjar hesar ormverurnar vóru, sum mineraðu bløðini av ávikavist sitkaelris- og dúnbjarkartrøum. Hesi bæði træsløgini eru eisini fongd við birkivevjara stóra, *Epinotia solandriana* (mynd 4), har ormverurnar gera sær eina lítla holu við at seyma bløðini saman.

Eg hevði lisið um stóru trupulleikarnar, sum íslendingar høvdu við einum lítlum húsvætti, *Heringocrania unimaculella*, við íslendska heitinum birkikemba, har ormveran júst livdi inni í sjálvum bjarkarblaðnum. Næstu trý árini leitaði eg eftir hesum smáu húsvættunum og savnaði ormverur, sum eg uttan úrslit royndi at klekja við hús.




**Map 1:** *Elrisnámsvespa er funnin í teimum 8 grønlitaðu oyggjunum*

Tíðliga á vári 2018 sendi eg nakrar myndir av bjarkarbløðum, sum vóru fongd við minerandi ormverum (mynd 5), til Ole Karsholt, sum er ein av fremstu serfrøðingunum í Evropa innan húsvætti, og hann segði beinanvegin, at tey kundu ikki vera frá einari húsvættaormveru, tí skarnið, t.v.s. ekskrementini, lógu skeivt í bløðunum. Heldur var líkt til, at talan var um eitt slag av minerandi vespuormveru.

*Tað finnast heilt nógv sløg av húsvættum og blaðvespum, sum leypa á elri og bjørk. Ymisku sløgini hava ymiska flogtíð, har tey tá eisini víggja, og eingin hevur kannað, nær ymisku sløgini flúgva og víggja í Føroyum.*

Seint í apríl hongdi eg nakrar gular klisturplátur (mynd 6) upp í nøkur bjarkartrø í Nólsoy og í Havn. Umleið hálvan mai komu tær fyrstu smáu (5-6 mm) blaðvespurnar á pláturnar (mynd 7), og um mánaðarskiftið mai-juni vóru nógvar smáar ókendar blaðvespur á plátunum, umframt at nakrar vórðu ristar av bjarkargreinunum niður í ein glúp. Av tí at eg ikki fangaði nakað húsvætti í hesum tíðarskeiðnum,

tóktist tað ósannlíkt, at tað skuldu vera húsvætti, sum mineraðu elris- og bjarkarbløðini.

*Yvirættin blaðvespur telur umleið 430 ymiskar ættir, og tað er ofta trupult at greina sløgini við vissu, av tí at flestu serfrøðingar, sum granska í hesum ættum, einans hava servitan um nakrar fáar ættir. Les eisini Frøði 2015-3.*

Ole Karsholt hevði samband við finska Marko Mutanen, sum helt talan vera um slagið bjarkarnámsvespa *Scolioneura betuleti* (Klug, 1816), men hann bað meg seta meg í samband við Andrew Liston í Týsklandi til tess at fáa eina heilt vissa greining av slagnum.

Eg sendi nøkur dømi til Andrew, og tá var úrslitið, at tað er elrisnámsvespa, *Scolioneura vicina* (Konow, 1894), sum plágar okkum í Føroyum. Einasti munurin á elrisnámsvespu og bjarkarnámsvespu er, at tann fyrra flýgur tíðliga á vári, meðan seinna slagið er at síggja seinni á árinum.

Elrisnámsvespan er funnin bæði á sitkaelri (*Alnus sinuata*) og dúnbjørk (*Betula pubescens*), meðan bjarkarnámsvespan ikki áður er funnin á elri. Men í avbyrgdum oyggjum sum í Føroyum kunnu smákykt liva av aðrari føði, enn tey gera á meginlandinum.

Í Nólsoy standa ein dúnbjørk og ein sitkaelri undir liðini hvør á aðrari, og tað var einans bjørkin, ið var fongd við vespuormverum. Í einum urtagarði í Hoydølum vóru trý sløg av elri, nevniliga sitkaelri (*Alnus sinuata*), svartelri (*Alnus glutinosa*) og reyðelri (*Alnus rubra*), men tað var einans træið av slagnum *A. sinuata*, sum var fongt við námsvespuormverum.

Fleiri serfrøðingar ivast í, um elrisnámsvespa og bjarkarnámsvespa í veruleikanum eru sama slag, men tað fer víðari gransking møguliga at vísa. Hesi bæði námsvespusløgini eru at finna í øllum Evropa, møguliga undantikið í Írlandi og á Balkanhálvoynni, og eru millum annað innslødd til Íslands, Norðuramerika og nú eisini til Føroya.

Í løtuni eru tær skrásettar í átta oyggjum (map 1), men tær eru væntandi at finna á øllum oyggjum, har bjarkar- og elritrø eru.



**Mynd 5:** *Bjarkarbløð fongd við minerandi ormverum*

## Eftirskrift:

Viðarvøkstur, sum t.d. ymisk pílasløg og bjørk, vaksa í øðrum londum – ofta á áarbakkum. Hesi sløgini av viðarvøkstri eru ofta heimbýli hjá hópi av ymsum flogkyktum. Ormverurnar hjá flogkyktunum detta tí ofta í áir og løkir og enda í stóran mun sum føði hjá sílum o.ø. Í øðrum londum verða hesi viðurskifti mett sum sera týdningarmikið føðigrundarlag hjá eitt nú sílum.

Tað kundi verið eitt hugskot at gróðursett meira av slíkum viðarvøkstri fram við føroyskum áum og løkjum og soleiðis ment føðigrundarlagið og stimbrað sílastovnin í føroysku áunum.

Fyrimyndina hava vit við hondina, um litið verður at kjarrvøkstrinum av pálmapíli (*Salix phylicifolia*), sum veksur fram við Stórá í Streymnesi.

## Takk

Takk fyri hjálpina til Ole Karsholt í Danmark, Marko Mutanen í Finnlandi, Andrew Liston í Týsklandi og Trónd Gilla Leivsson.

## Tilvísingar

Altenhofer, E. & Taeger, A. 1998: Zur Kenntnis der Gattung Scolioneura Konow, 1890 (Hymenoptera: T enthredinidae). pp. 225-226. In: Taeger, A.; Blank, S.M. (eds) 1998: Pflanzenwespen Deutschlands (Hymenoptera, Symphyta). Kommentierte Bestandsaufnahme. - Goecke & Evers, Keltern: 1-364 + [3] pp.

Jensen, J-K. og Bloch, D. 2001. Vespur. Frøði 7, 1: 4-7.

Jensen, J-K. 2015. Snultivespa nú skrásett í Føroyum - Fýrsnultivespur (*Spathius exarator*) skrásettar fyrstu ferð í Føroyum. Frøði 2015-3:8-9.

Ólafsson, Erling 2018. https://www.ni.is/biota/animalia/arthropoda/hexapoda/insecta/lepidoptera/eriocraniidae/birkikemba-heringocrania (sæð: (dato))

# ROTTAN ER KOMIN TIL FØROYA Í TRIMUM UMFØRUM

**Fyrst kom hon til Hvalbiar. Tað var í 1768. Árið eftir kom hon til Havnar. Haðani spjaddi hon seg til restina av Streymoynni og kom eisini til Eysturoynna og Vágar. 120 ár seinni kom rottan eisini í Borðoynna. Hetta staðfesta úrslit í nýggjari genkanning, sum nýliga er almannakunngjørd í kenda vísindaliga tíðarritinum Heredity.**




**Eyðfinn Magnussen**
EydfinnM@setur.fo
Lektari í lívfrøði,
Fróðskaparsetur Føroya


Fyrr hevur verið hildið, at rotturnar, sum komu til Suðuroynna, spjaddu seg til Havnar, men nýggja kanningin vísir, at so er ikki. Hóast tað bara var eitt ár frá tí, at rottan kom til Hvalbiar, til hon eisini varð sædd í Havn, so er talan um ymiskan uppruna.

Meðan rotturnar í Hvalba hava sín uppruna í Norra ella kanska onkrastaðni í Stórabretlandi, so ber við vissu til at siga, at havnarrotturnar í síni tíð komu úr Stórabretlandi.

## Spjaðing av livandi verum

Ofta er spjaðing av dýrum knýtt at menniskjum. Frá søguligum keldum vita vit, at fólk hava tikið húsdjór og plantur við sær, tá tey eru flutt til nýggj landaøki at búgva.

Umframt húsdýrini eru eisini onnur dýr og plantur komin við, antin við vilja ella av óvart. Men dýr og plantur kunnu eisini sjálv spjaða seg. Eitt nú kunnu fuglur og fiskur, sum sjálv kunnu flyta seg langar teinar, sjálvi koma til nýggjar bústaðir.

Sama er galdandi fyri insektir og plantufræ, sum kunnu fúka langar leiðir við vindinum.

Ein væl dámdur partur av okkara søguskriving eru lýsingar av, hvat er fyrifarist rundan um okkum. Hvaðani koma vit, og hví eru dagsins umstøður júst soleiðis, sum tær eru?

Ein partur av hesi lýsing er eisini at greiða frá, hvørji dýr eru her og hvaðani og hvussu tey eru komin higar. Fyrr hava granskarar fyri tað mesta nýtt skrásetingar og aðrar søguligar keldur til at lýsa hesi ferðingarmynstur.

Men ofta hava hesar lýsingarnar ikki verið nóg neyvar, tí vit vita ikki altíð við vissu, hvaðani upprunin er. Í fleiri førum mangla skrásetingar, og onkuntíð eru dýr og plantur komin higar fleiri ferðir.

Men nýggjar tíðir geva nýggjar møguleikar. Við nútíðar genkanningum kunnu granskarar í dag fylgja ferðingarmynstrunum hjá livandi verum fleiri túsund ár aftur í tíðina.

Við hesum kanningarháttum ber eisini til at meta um slektskapin, um upprunan og um, nær hesar livandi verur hava skilt seg frá einum øðrum bólki (Mynd 1). Tað eru júst tílíkar framkomnar DNA-kanningar, sum nú eru gjørdar av føroysku rottuni.

## At lesa í lívsins søgubók

Í kyknunum hjá øllum livandi verum finna vit DNA. DNA eru kemisk evni, sum mynda arvaeginleikarnar hjá livandi verum. Hesar eginleikar fáa vit frá okkara foreldrum, sum sjálv hava arvað teir frá sínum mammu og pápa, sum aftur hava arvað sínar arvaeginleikar frá mammu og pápa sínum.

Soleiðis heldur søgan fram aftur í tíðina. Vit, sum liva í dag, eru sostatt eitt úrslit av tí, sum hendi fyri nógvum ættarliðum síðani. Við at lesa í arvastreinginum hjá livandi verum kunnu vit sostatt lesa okkum aftur í fortíðina (Mynd 1). Hetta er galdandi fyri menniskju, men er eisini galdandi fyri dýr, plantur og aðrar livandi verur.

Arvaeginleikar hjá livandi verum eru ikki fastfrystir,






**Mynd 1:** *Við at kanna DNA-ið hjá livandi verum, eitt nú rottum, ber til at finna fram til ættarbondini, og hvaðani rotturnar hava sín uppruna. Við støði í hesum upplýsingum ber til at seta upp eitt ættartræ, sum vísir líkskapin millum rottur ymsastaðni frá. Í trænum ganga teir genetisku eginleikarnir sum æðrar niður gjøgnum træið. Í hesum trænum kunnu vit so arbeiða okkum gjøgnum greinarnar aftur í tíðina og finna fram til upprunan hjá rottunum. Eisini ber til at gera tíðarrokningar og meta um, hvussu mong ár eru liðin, síðani tær ymisku greinarnar eru farnar hvør frá aðrari. Á myndini vinstrumegin er víst eitt tílíkt dømi. Samlaðu genetisku eginleikarnir (genomið) hjá rottu eru umleið 3 milliardir (3.000.000.000) basupør til longdar, men fyri at gera tað lættari at skilja, eru einans 8 DNA-basupør tikin við á hesi myndini. "Rotta 1" hevur eginleikarnar ".. AUGCAACU..". Hjá "rottu 2" er eitt A broytt til eitt U. Tí fáa vit eina nýggj grein. Á hesi greinini henda aftur mutatiónir. Hjá "rottu 3" broytist eitt U til eitt G, og hjá "rottu 4" broytist eitt C til eisini til eitt G. Hjá "rottu 5" er eingin broyting, og hon er tí genetisk líka sum "rotta 1", ".. AUGCAACU..".*

*Í kanningini av føroysku rottunum vórðu umleið 32.000 markørar, sokallaðar "single nucleotide polymorphisms" (SNP), kannaðir og samanbornir. Við hesum upplýsingunum ber til at avdúka, hvussu føroyska rottan hevur spjatt seg, og hvaðani rotturnar, sum komu til Føroyar fyri ávikavist 250 og 120 árum síðani, hava sín uppruna.*

men kunnu broytast. Hetta kann til dømis vera við mutatiónum. Við einari mutatión broytist DNA-kotan, og eftirkomararnir hjá hesi veruni arva hendan "nýggja" eginleikan. Sum tíðin líður, henda alsamt fleiri mutatiónir, og ymiskleikin millum verurnar verður alsamt størri (Mynd 1).

Tá lívfrøðingar arbeiða við livandi verum, nýta teir ofta hugtakið "populatión". Ein populatión er ein bólkur av livandi verum, sum hoyra til somu art og liva í einum avmarkaðum øki. Um onkur av forfedrunum til eina populatión ella um onkur av individunum í populatiónini fáa ein "nýggjan" genetiskan eginleika, verður hesin eginleikin førdur víðari til næsta ættarliðið.

## Spjaðing av rottuni kring knøttin

Brúna rottan (*Rattus norvegicus*), sum í dag er í Føroyum, hevur sín uppruna í Landsynningsasia.

Genetiskar kanningar vísa, at fyri 3.100 árum síðani spjaddist hon haðani. Fyrst norðureftir, síðani eisini eystureftir til Miðeystur.

Fyri eini 2.000 árum síðani flutti hon seg haðani og suðureftir til Afrika, og so fyri umleið 1800 árum síðani eisini norðureftir til Evropa (Mynd 2).

Aðrar keldur siga, at brúna rottan kom til Evropa miðskeiðis í 1500-árunum. Vit vita við vissu, at hon fyrstu ferð varð sædd í Írlandi í 1722, í Onglandi í 1730, í Fraklandi í 1735, í Týsklandi í 1750 og í Spania í 1800. Til Danmarkar kom hon umleið 1725 og til Norðuramerika kom hon umleið í 1750-1755.




**Mynd 2:** *Genetiskar kanningar vísa, at brúna rottan, sum í dag eru í Føroyum, hevur sín uppruna í Landsynningsasia. Fyri 3.100 árum síðan spjaddi hon seg til Miðeystur, haðani til Afrika fyri 2.000 árum síðani og síðani eisini til Evropa fyri umleið 1800 árum síðani.*




**Mynd 3:** *Spjaðingarmynstrið hjá rottuni í Føroyum, grundað á skrivligar keldur. Fyrstu rotturnar komu til Hvalbiar. Hetta var í 1768. Haðani spjaddu tær seg: fyrst til Havnar og haðani norður eftir Streymoynni. Síðani til Eiðis og restina av Eysturoynni. Seinni komu tær til Vágarnar. Um aldaskiftið, ár 1900, komu tær eisini til tríggjar av Norðoyggjunum. Í dag er rottan at finna í sjey av teimum 18 oyggjunum.*

## Spjaðing av rottuni í Føroyum

Fyrstu rotturnar komu til Føroya í 1768. Tað var í Hvalba. Haðani spjaddi hon seg til hinar stóru oyggjarnar. Um hetta mundið gjørdi Jens Christian Svabo sína kendu Føroyaferð, sum hann seinni skrivar um í bókini *Indberetninger fra en Reise i Færø 1781 og 1782*.

Í hesum stórverki greiðir hann frá ymiskum, sum hann hevur savnað saman um Føroyar og føroysk viðurskifti. Her greiðir Svabo millum annað frá, nær brúna rottan er komin til tær ymisku bygdirnar í Føroyum.

Takkað verið Svabo vita vit tí neyvt, hvussu rottan hevur spjatt seg kring landið, og nær rottan kom til tær ymisku føroysku bygdirnar. Hesar upplýsingar eru millum annað grundarlagið undir spjaðingarmynstrinum av rottu í Føroyum, sum er víst á kortinum á mynd 3. Til Norðoyggjar kom brúna rottan 120 ár seinni. Hetta hendi um ár 1900, tá hon kom til Norðdepils á Borðoynni. Hagar kom hon við norðmonnum, sum árini 1898 til 1901 høvdu hvalastøð á Kópagørðum, sum er einar 200 metrar norðanfyri, har byrgingin í dag er um Hvannasund.

## Føroysku genkanningarnar

Síðani í 2011 hevur Fróðskaparsetrið gjørt ymiskar kanningar av føroyskum rottum. Fólk, sum hava funnið deyðar rottur, hava latið Fróðskaparsetrinum rotturnar. Á henda hátt er tað higartil eydnast at fáa fatur á eini 250 rottum til at gera vísindaligar kanningar av.

Genetisku kanningarnar av føroysku rottunum eru eitt samstarv millum Fróðskaparsetrið og granskarar á russiska akademinum fyri náttúruvísindi í Moskva, granskarar á universitetinum í Uppsala í Svøríki og frá teimum báðum amerikansku universitetunum, Universitetinum í Memphis og Fordham University.

Genetisku kanningarnar vóru gjørdar av 85 føroyskum rottum, sum vóru fingnar í 24 bygdum og býum kring um í Føroyum.

Genetisku úrslitini frá føroysku rottunum vórðu síðani samanborin við úrslitini frá rottum, sum vórðu fingnar í 41 býum í Evropa, Russlandi og aðrastaðni kring um í heiminum.

Kanningar vístu, at brúna rottan er komin til Føroya í trimum umførum, og at tær eru komnar ymsastaðni frá, óheftar av hvørjari aðrari.

## Rotturnar í Suðuroy

Genetisku kanningarnar av rottunum í Suðuroynni og Norðoyggjum staðfestu tað, sum vit longu vistu frá skrivligum søguligum keldum.

Rotturnar í Suðuroy kunnu hava sín uppruna í Norra, men Stórabretland er eisini ein møguleiki (Mynd 4 og 5).

Júst hvaðan úr Stórabretlandi tær komu, ber tó ikki til at siga, tí sýni av rottum vóru bara frá tveimum býum í Miðonglandi: Nottingham og Liverpool. Fyri at fáa ein betri neyvleika er neyðugt við sýnum úr fleiri støðum í Stórabretlandi, serliga úr Skotlandi og teimum skotsku oyggjunum.

Úrslitini við nútímans genetiskari tøkni prógva tað, sum Jens Christian Svabo greiðir frá í síni




**Mynd 4:** *Føroysku rotturnar skilja seg genetiskt frá hinum rottunum í Evropa. Rotturnar, sum í dag eru í Streymoynni, Eysturoynni og Vágum fella saman í ein "klump". Hetta vísir, at tær eru rættiliga líkar genetiskt og hava ein felags uppruna. Rotturnar í Suðuroynni og Norðoyggjum liggja í hvør sínum klumpi. Tær eru ymiskar frá hinum føroysku rottunum og hava annan uppruna. Myndin vísir eisini, at tær føroysku rotturnar eru genetiskt ymiskar frá rottunum í Skandinavia og Evropa. Serliga eru tað rotturnar í Streymoynni, Eysturoynni og í Vágum, sum bregða frá hinum.*

ferðafrásøgn. Hann skrivar, at tað var eitt norsk skip, sum kom úr Tróndheimi í Norra, men rendi á land á skotsku oynni Lewis. Skipsvrakið, sum var fult av rottum, rak á land í Hvalba, og við tí vóru rotturnar komnar til Suðuroynna. Rotturnar kunnu antin vera komnar umborð á skipið, áðrenn tað fór úr Norra, ella eftir at skipið hevði rent á land á skotsku oynni. Bæði eru møgulig. Tað kann eisini hava verið ein blanding av rottum frá báðum londunum. Hesi sporini síggjast aftur í teimum nútímans genetisku kanningunum, sum vit nú hava gjørt av eftirkomarunum hjá rottunum, sum komu til Suðuroynna fyri 250 árum síðani.

## Rotturnar í Norðoyggjum

Genetisku kanningarnar av rottunum í Norðoyggjum vístu, at tær hava sín uppruna í Stórabretlandi ella møguliga úr Suðuroy (Mynd 4 og 5).

At kanningarnar vísa, at rotturnar í Norðoyggjum møguliga eru komnar úr Suðuroynni, er kanska ikki so løgið. Vit vita, at rotturnar har norðuri fyrst komu til Norðdepils á Borðoynni. Tað var um ár 1900. Hagar komu tær við norðmonnum, sum høvdu hvalastøð í Norðdepli. Um sama mundið høvdu norðmenn eisini hvalastøð í Lopra í Suðuroynni, og helst hava norsku hvalabátarnir, og eisini onnur skip, siglt í millum hesar báðar norsku hvalastøðirnar, og tá er óivað onkur rotta eisini komin norður við úr Lopra til Norðdepils.

Eisini hesi sporini kunnu nútíðar genetiskar kanningar finna fram til í dag, 120 ár eftir at hvalastøðin í Norðdepli læt aftur.

## Rotturnar í Havn

Tað mest óvæntaða úrslitið í teimum genetisku kanningunum kom frá rottunum í Havn. Í bókini "*Indberetninger fra en Reise i Færø 1781 og 1782*", greiðir Jens Christian Svabo frá, at rotturnar, sum komu til Havnar í 1769, møguliga komu úr Suðuroynni, hagar tær vóru komnar eitt ár frammanundan.

Okkara kanningar vístu tó, at rotturnar, sum komu til Havnar, eitt ár eftir at tær vóru komnar til




**Mynd 5:** *Rotturnar í Føroyum eru genetiskt ymiskar (mynd A). Rotturnar, sum eru fingnar í teimum sjey bygdunum í Streymoynni, líkjast allar genetiskt (appilsingult, til vinstru á mynd C), og eru eisini rættiliga líkar teimum í Vágum og í Eysturoynni (grønt, til vinstru á mynd C). Rotturnar í hesum trimum oyggjunum hava sín uppruna í Stórabretlandi. Rotturnar í Viðoynni og Borðoynni (myrkablátt, til vinstru á mynd C) og tær í Suðuroynni (ljósablátt, til vinstru á mynd C) skilja seg tó týðiliga frá rottunum í hinum trimum oyggjunum og hava helst sín uppruna í Stórabretlandi ella Norra.*

Hvalbiar í 1768, ikki eru komnar úr Suðuroynni, sum fyrr hildið, men at talan hevur verið um eina sjálvstøðuga innrás av "nýggjum" rottum, sum komu úr Stórabretlandi (Mynd 3, 4 og 5).

Rotturnar hava síðani spjatt seg norður eftir oynni, haðani tær so eisini eru komnar til Eysturoynna og Vágar eini 7 til 10 ár seinni. Hetta er nýggj vitan fyri okkum, og hetta høvdu vit ikki vitað, um genetisku kanningarnar ikki vórðu gjørdar.

Kanningin vísir eisini, at tað er stórur munur á genetisku eginleikunum hjá rottunum í teimum sjey oyggjunum í Føroyum, har rotturnar í dag eru. At tað er genetiskur munur millum oyggjarnar vísir, at tað er lítið samband millum rotturnar í teimum ymisku oyggjunum. Hetta er av stórum týdningi at vita, um vit einaferð í framtíðini fara undir at týna rottuna í Føroyum. Tá ber betur til at taka eina oyggj í senn, og síðani fara undir at týna rotturnar á næstu oynni, av tí at sambandið millum oyggjarnar er so lítið.

## Keldur:


E. E. Puckett, E. Magnussen, A. K. Liudmila, T. M. Strand, A. Lundkvist, and J. Munshi-South (2019). Genomic analyses reveal three independent introductions of the invasive brown rat (*Rattus norvegicus*) to the Faroe Islands. Heredity, Published online 9. aug. 2019.

L. Zeng, C. Ming, Y. Li, L. Y. Su o.f. (2018). Out of Southern East Asia of the Brown Rat Revealed by Large-Scale Genome Sequencing. Molecular Biology and Evolution 35 (1):149-158.

E. E. Puckett, J. Park, M. Combs o.f. (2016). Global population divergence and admixture of the brown rat (*Rattus norvegicus*). Proceedings of the Royal Society B-Biological Sciences 283 (1841).








# VÍSINDAVØKAN 2019
## ARVUR

Vísindavøkan í 2019 var 20. september í Sjóvinnuhúsinum. Evnið á Vísindavøkuni í ár var ARVUR. Granskarar og starvsfólk frá granskingarstovnum í Føroyum høvdu framløgur, framsýningar og tiltøk, sum á ymsan hátt snúðu seg um ARV. Evnið varð tulkað í víðastu merking og endamálið var at fáa tey vitjandi at undrast, seta spurningar og kveikja hugsanir í komandi tíðum.

Tiltakið var í fleiri pørtum og til ymsar málbólkar. Nøkur tiltøk vóru í Kongshøll, ið serliga vóru hugsað til lesandi á Fróðskaparsetrinum, miðnámi og Nám X og 10. flokkum kring landið. Á svalanum á aðru hædd vóru ymisk tiltøk og framsýningar. Her var høvi at hitta granskarar, spyrja og royna. Tiltøkini á svalanum vóru hugsað til almenning, lesandi og skúlanæmingar frá umleið 5. flokki.

Vísindavøkan var eins og áður á ferð kring landið. Og fleiri av framløgunum á Vísindavøkuni vórðu filmaðar og verða vístar í Kringvarpi Føroya og síggjast eisini á netinum.

Vísinda vøka